

# TVÍMÆLTIR NÆMINGAR Í FØROYSKA FÓLKASKÚLANUM

– ein vegleiðing um karmar, trivnað, og hvussu undirvísing kann verða løgd til rættis

Mentamálaráðið

ÚTLENDINGASTOVAN

**Útlendingastovan, Mentamálaráðið 2020**
Skrivað og ritstjórn: Johan Jacobsen, fulltrúi,
og Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari
Finst í prenti í avmarkaðari nøgd og á heimasíðunum:
www.integration.fo og www.ummr.fo
Umbrotið, prentað og heft: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# INNIHALDSYVIRLIT

**Formæli** .......... **5**

**I. Karmur og skipanir** .......... **7**
Undirvísingarskylda .......... 7
Serstøk undirvísing í føroyskum .......... 8
Førleikastovan .......... 11
Ábyrgd skúlaleiðarans .......... 11
Flokslæraraskipan .......... 12

**II. Móttøka, skúlabyrjan og trivnaður** .......... **13**
Móttøka og ábyrgd skúlaleiðarans .......... 13
Móttøka .......... 13
Trivnaður .......... 16
Stórar væntanir – ikki lítlar .......... 20

**III. At skipa undirvísing og dømi um undirvísingarhættir** .......... **23**
Skúlagongd krevur eisini fakmálsligar førleikar .......... 23
Tríggir undirvísingarhættir .......... 24

**IV. Foreldrasamstarv, samskifti og tulking** .......... **29**
Foreldrasamstarv .......... 29
Tulking – ein týðandi liður í samstarvinum við foreldrini/heimið .......... 30

**V. Dømi um undirvísingarmiðlar** .......... **31**

**Fylgiskjøl** .......... **35**
Oyðublað .......... 36
Vanligastu orðini .......... 37
Faklig orð .......... 38
Leinki til viðkomandi lógarverk .......... 39
Uppihaldsloyvi til børn (undir 18 ár) .......... 40

**Keldur og bókmentir** .......... **41**



# FORMÆLI

Hesin bóklingur er fyrst og fremst ætlaður sum leiðbeining til skúlarnar í sambandi við at taka ímóti næmingum, ið eru *tvímæltir,* at leggja undirvísingina til rættis og at skipa samstarv við foreldur og myndugleikar, sum varða av økinum. Harumframt vóna vit, at frítíðartilboð, frítíðarskúli, ráðgevar og aðrir ábyrgdarpersónar, ið hava tilknýti til fólkaskúlan og integratiónsøkið, hava áhuga fyri hesum bóklingi.

Bóklingurin fevnir um skipan, mannagongdir og atlit, sum skulu takast, tá ið hesir næmingar byrja í fólkaskúlanum, uttan mun til, hvørjum aldri teir eru í, tá ið teir koma til Føroya. Áherðsla verður løgd á týdningin, ið móttøkan hevur, at skapa relatiónir og trivnað, at skipa undirvísingina, seta mál og eftirmeta og virka fyri at fremja inklusjón í verki og soleiðis styrkja skúlatilboðið til tvímæltar næmingar.

Roynt verður at svara spurninginum, hvussu vit á bestan hátt kunnu taka ímóti og undirvísa tvímæltum næmingum. Hetta er ein stór avbjóðing, tí talið á tilflytarum veksur støðugt. Tað ræður tí um, at skúlarnir hava fyriskipanir, vitan innan økið og mannagongdir, ið skapa trivnað og góðar umstøður fyri læring og menning. Sum í øðrum uppgávum ber ikki til bara at leggja áherðslu á einstøk viðurskifti, tí tað má vera samanhangur millum karmar, mannagongdir, undirvísing og trivnað.

Í samgonguskjalinum frá september 2019 stendur, at *neyðugt verður at styrkja mál- og mentanarundirvísingina hjá næmingum við fremmandum uppruna.*[1] Bóklingurin er eisini gjørdur við hesi staðfesting í huga.

Á vári 2019 skipaðu Útlendingastovan og Mentamálaráðið fyri fýra verkstovum, har ein arbeiðsbólkur við níggju lærarum umrøddi evnið bæði við atliti at tí skipan, vit hava í dag, og hvat eigur at verða gjørt fyri at menna undirvísingartilboðið hjá tvímæltum næmingum. Kannað varð eisini, hvat gjørt verður í okkara grannalondum, umframt at serkøn greiddu frá sínum sjónarmiðum viðvíkjandi trivnaði, inklusjón og máltøku. Limirnir í arbeiðsbólkinum hava nógvar royndir at undirvísa í føroyskum sum annaðmál og løgdu fram royndir og vitan, sum teir høvdu ognað sær í hesum arbeiði, eisini í lesnaði og styttri skeiði. Nógv av hesum sæst aftur í bóklinginum, og í skjølum aftast eru nøkur dømi um undirvísingarmiðlar, sum í verki hava givið góð úrslit.

Karmur og skipanir – sum eru grundarlagið undir tí arbeiði, sum gjørt verður, og teimum átøkum, sum kunnu setast í verk undir verandi skipanum – eru lýst í fyrsta parti. Í øðrum parti eru umrødd móttøka, skúlabyrjan og trivnaður, har ímillum góð ráð í sambandi við skúlabyrjanina hjá tvímæltu næmingunum. Triði partur viðger stóra evnið, hvussu undirvísingin kann verða løgd til rættis umframt mannagongdir, har víst verður á møguleikar í arbeiðinum at virka fyri at menna skipanina og at loysa ymisku avbjóðingarnar. Í fjórða parti verður nomið við gott samskifti og foreldrasamstarv, og í fimta parti verða nøkur dømi um undirvísingartilfar og -miðlar løgd fram.

## Tvímæltir næmingar

Umrøtt er eisini, hvat heiti vit skulu nýta fyri undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar í skúlaaldri, har annað ella bæði foreldrini hava annað móðurmál enn føroyskt. Í § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini[2] er ásett: *Næmingar, ið hava føroyskt sum seinna málið, kunnu í hóskandi vavi fáa serstaka undirvísing í føroyskum. Landsstýrismaðurin kann harumframt áseta, at boðið skal vera tvímæltum næmingum undirvísing í teirra móðurmáli. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um undirvísing av tvímæltum næmingum, og kann hann í hesum sambandi víkja frá § 5, 1.-4. stk., §§ 7, 9 og 19, 1., 2., 3. og 5. stk. og § 26, 1. stk.*

1 *Samgonguskjal 2019-2023*, bls. 15. www.lms.fo.
2 Løgtingslóg nr. 125 frá 20. Juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019.

Her verða nýtt tvey heiti – næmingar, sum hava *føroyskt sum seinna málið*, og *tvímæltir næmingar*. Talan er um næmingar, sum hava eitt annað móðurmál enn føroyskt, og sum skulu læra føroyskt, tá ið teir verða skrivaðir inn í fólkaskúlan. Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at veita hesum næmingum serstaka undirvísing í føroyskum í hóskandi vavi.

Samstundis er ásett, at landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um undirvísing hjá tvímæltum næmingum, og at boðið kann verða næmingunum undirvísing í teirra egna móðurmáli. Hesar reglur eru ásettar í kunngerð nr. 144 frá 6. oktober 2020 um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing, hereftir nevnd kunngerðin.

Tá ið vit brúka orðingina *tvímæltir næmingar*, verður hugsað um 1) næmingar, ið brúka annað mál enn føroyskt sum fyrsta málið og tí hava ein ávísan tørv á málmenning orsakað av, at viðkomandi og familjan eru tilflytarar. Endamálið er, at næmingarnir læra føroyskt, so at teir kunnu nýta føroyskt í samskifti, talu og skrift, og soleiðis verða tvímæltir. Her verður ikki hugsað um flestu føroyingar, ið hava føroyskt sum fyrsta mál og danskt sum annað. 2) Talan kann eisini verða um barn, sum er føtt í Føroyum, men vaksið upp í einum heimi við øðrum móðurmáli enn føroyskum.[3] Talan er um børn við ymiskum málførleikum og tørvi á undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Soleiðis er tørvurin eisini ymiskur og krevur ymisk átøk. Hesi viðurskifti eru nærri lýst í § 1 og 2 í nevndu kunngerð.

Sum tilskilað í § 5, stk. 6, so kann landsstýrismaðurin eisini áseta, at boðið verður tvímæltum næmingum undirvísing í teirra móðurmáli. Virkað eigur at verða fyri, at henda áseting verður sett í verk, tí at móðurmálið er so umráðandi sum grundarlag og samleiki hjá barninum og tí læring og menning, sum næmingurin er partur av. Móðurmálsundirvísng er somuleiðis ásett í kunngerðini.

## Ástøði og keldur

Umstøðurnar í grannalondum okkara eru á mangan hátt øðrvísi, tá ið hugsað verður um tilflytarar og tær avbjóðingar, sum bæði børn og familjur teirra hava. Talan er ofta tá um flóttafólk, sum eru flýdd heimanífrá vegna kríggj, harðskap ella forfylging, og sum kunnu vera rættiliga meint rakt av hesum, meðan tilflytarar, sum koma til Føroya í høvuðsheitum eru útlendskir arbeiðstakarar og familjusameind. Kortini eru nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum eru tey somu hjá bæði næmingum og lærarum; málsliga avbjóðingin, trivnaður og undirvísing. Tað, sum er felags, og sum hevur stóran týdning fyri, at læringin skal eydnast, er arbeiðið at leggja til rættis undirvísing og móttøku, so næmingarnir verða partur av flokkinum, læra málið og kenna tað samfelag og ta mentan, teir eru komnir til.

Hesi felags viðurskifti gera, at til ber at nýta tilfar frá okkara grannalondum sum íblástur í sambandi við at lýsa og gera mannagongdir fyri, hvussu vit kunnu skipa arbeiðið, tá ið næmingar, ið ikki duga føroyskt ella hava vantandi málsligan førleika í føroyskum, byrja í skúlanum. Í tí tilfari, vit hava lisið, er tað serliga danska tilfarið frá 2017[4], sum vit halda vera viðkomandi at nýta sum fakligan íblástur.

Ofta verður hugtakið *integratión* brúkt í fleiri ymiskum samanhangum og um ymisk fyribrigdi.[5] Vit halda, at integratión snýr seg um, at tilflytarar trívast í føroyska samfelagnum, at myndugleikarnir skapa umstøður og veita hóskandi tilboð til tann einstaka og útinna sítt virksemi sambært lóggávu og altjóða rættindum hjá børnum.

Hesir lærarar luttóku á verkætlanardøgunum:
*Sanna Vitalis, Skúlin á Argjahamri*
*Tórhild Bjarkhamar, Skúlin í Eysturkommunu*
*Aud Joensen, Sankta Frans skúli*
*Tom Joensen, Eiðis skúli*
*Eyð Niclasen, Sørvágs skúli*
*Álvgerð Johannesen, Tvøroyrar skúli*
*Brynhild W. Djurhuus, Skúlin við Løkin*
*Anja S. Samuelsen, Á Skúlatrøð*
*Tonnie Strøm, Skúlin á Fløtum*

*Johan Jacobsen, fulltrúi í Útlendingastovuni, og Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, hava skipað fyri verkætlanini og vegleiðingini.*

*Styttri fyrilestrar á verkætlanardøgunum:*
*Gitte Klein (www.grit.fo) – um trivnað sum fortreyt fyri innlæring*
*Sissal M. Rasmussen (www.malmenning.fo) – um tvímæli og undirvísing*

3 Orðið *tvímælt* verður her tikið fram um aðrar vendingar, so sum fremmandamælt ella fleirmælt, m.a. tí hetta í størri mun er í tráð við altjóða málbrúk, eisini innan málvísindi (sí t.d. Myers-Scotton, *Multiple Voices – An Introdution to Bilingualism*, Oxford 2006, bls. 44).
4 *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever (Vidensnotat)*, Undervisningsministeriet 2017. Og: *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever – Fokus på nyankomne elever (Vidensnotat)*.
5 Sí eisini álitið frá 2011, *Integrasjónsálit*, bls. 3. Parturin *Børn í skúlaaldri*, bls. 23-24, snýr seg um, hvussu mann tá sá avbjóðingina.

# KARMUR OG SKIPANIR*

**Hesin partur snýr seg um karmar um skúlan í sambandi við næmingar við tilflytarabakgrund. Umrødd verða hesi evni:**

- Innskriving og undirvísingarskylda
- Serstøk undirvísing í føroyskum
- Tímajáttan eftir § 5, stk. 6
- Førleikastova
- Flokslæraraskipan
- Ábyrgd skúlaleiðarans

Tilflyting til Føroya fer fram sambært útlendingalógini, sí fylgiskjal 5, og í høvuðsheitum snýr tað seg um familjusameining og samfylgjandi familju hjá útlendskum arbeiðstakarum. Næmingarnir koma sostatt til Føroya antin sum partur av familjusameining ella saman við foreldrum, sum hava fingið arbeiðsloyvi í Føroyum.

Tá ið barn í skúlaaldri flytur til landið og skal byrja í skúla, kann tað vera óvist, júst hvussu leingi barnið fer at búgva í landinum; tað kann verða alt frá einum ári til restina av lívinum.

Fólkaskúlalógin er karmur um undirvísingina hjá næmingum í skúlaaldri. Knýtt at lógini eru kunngerðir, rundskriv, reglur og námsætlanir, sum nærri lýsa ymisk viðurskifti í sambandi við læringina og skúlagongdina hjá næmingunum.

**Tríggir tættir í sambandi við innskriving**
- Undirvísingarskylda, § 40
- Serstøk undirvísing í føroyskum í fólkaskúlalógini og ásetingar í kunngerðini, § 5, stk. 6
- Flokslæraraskipanin, kunngerð nr. 37 um flokslæraran

## Undirvísingarskylda

Undirvísingarskylda er umrødd í § 40 í fólkaskúlalógini, har ásett er, at *eitt og hvørt barn, sum býr her á landi, hevur undirvísingarskyldu eftir reglunum í §§ 42-44, uttan so er, at galdandi er fyri tað reglur um undirvísingarskyldu í aðrari lóggávu. Sama er galdandi fyri børn, sum skulu vera her í landinum í minsta lagi seks mánaðir.* Sostatt skuldu øll børn, sum koma til landið, havt undirvísingarskyldu, um tey skulu vera í Føroyum í seks mánaðir, men í viðmerkingunum til lógina verður tilskilað, at hetta er galdandi frá tí, at barnið hevur fingið uppihaldsloyvi og fastan bústað. Serligar umstøður kunnu tó altíð gera seg galdandi, so sum long viðgerðartíð hjá útlendingamyndugleikanum, so tað kann ganga

* Hesin parturin er serliga viðkomandi hjá leiðarum og teimum, ið fyriskipa undirvísing.

rúm tíð, til uppihaldsloyvið er avgreitt. Skúlin má gera eina meting í hvørjum einstøkum føri, tí atlit skulu altíð fyrst takast til barnið, ið er í landinum. Tað er ymiskt, hvussu lógin verður tulkað, og tað kann vera óheppið fyri barnið, um tað skulu ganga mánaðir, áðrenn barnið sleppur í skúla, tí at bíðað verður eftir avgerð um uppihaldsloyvi.

**Sambært samskifti við Barnanna umboðsmann verður mett, at tað er í stríð við grein 2 og grein 28 í Barnarættindasáttmálanum, um tað gongur ov long tíð til at barn, sum bíðar eftir uppihaldsloyvi, fær undirvísing. Børn eiga at fáa undirvísing so skjótt sum til ber og helst innan tríggjar mánaðir.**

## Serstøk undirvísing í føroyskum

Tá ið barn, sum flytur til Føroya, verður skrivað inn í fólkaskúlan, skal skúlin meta um tørvin hjá næminginum á eyka undirvísing í føroyskum sambært § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini og § 3 í kunngerðini.

Skúlin metir um tørvin á eyka undirvísing við atliti at aldri næmingsins og øðrum viðurskiftum, so sum í hvørjum árgangi næmingurin eigur at ganga, hvørja skúlagongd hann hevur frammanundan, hvørji hansara áhugamál eru, hvat móðurmál hansara er, tosar hann onnur mál, duga foreldrini føroyskt ella annað norðurlendskt mál, og hvat mál verður tosað heima (sí meiri um arbeiðið at lýsa og at kenna næmingin á bls. 14-15). Skúlin sendir í serligum oyðubláði umsókn til Undirvísingarstýrið um eyka undirvísing í føroyskum, har skúlin kunnar um nevndu viðurskifti, sum skúlin hevur fingið upplýsingar um í sambandi við innskrivingina. Umsóknarblaðið er lagt hjá sum fylgiskjal 1 (sí bls. 36).

Næmingur kann fáa undirvísing í sínum móðurmáli sambært somu áseting. Hetta hava vit fáar royndir við í Føroyum, men Mentamálaráðið hevur í mong ár veitt føroyskum skúlum uttanlands í Danmark og Íslandi stuðul til undirvísing í føroyskum, har børn hjá føroyingum kunnu koma leygardagar og fáa undirvísing í føroyskum máli, søgu, mentan og samfelagsviðurskiftum. Tílík skipan eigur eisini at verða gjørd fyri tvímæltar næmingar í Føroyum, tí samleikin hjá tí einstaka hevur stóran týdning fyri bæði læring og menning og førleikan at virða og skilja sína bakgrund. Tað nýtist als ikki at vera ein trupulleiki, sum foreldur onkuntíð eru bangin um, at eitt barn mennir tvey mál í sama tíðarskeiði (t.e. lærir seg føroyskt og heldur móðurmálið við líka við at fáa undirvísing í móðurmálinum). Móðurmálið forðar ikki fyri tí seinna málinum, og tað sama er galdandi hinvegin.[6] Umráðandi er, at barnið eisini fær møguleikan at halda fast við sítt móðurmál, sum sambært kanningum styrkir teirra samleika og førleikan at læra onnur mál.

Umframt málsligar og fakligar førleikar eigur skúlin hava aldurin á barninum í huga, tí ásett er í § 12, stk. 1 í fólkaskúlalógini, at næmingarnir verða undirvístir á tí floksstigi í grundskúlanum, ið samsvarar við skúlaaldur teirra. Næmingur kann tó í samráð við foreldur ella avvarðandi verða undirvístur á sama floksstigi í 2 ár, um hann ikki hevur fingið undirvísing í longri tíð, ella aðrar serligar grundir benda á, at hetta er best fyri hann.

Vanliga verður næmingur innskrivaður í tann árgang, sum hann hevur aldur til. Um fakligi og málsligi førleikin ikki samsvarar við aldursstigið, so er neyðugt at veita næminginum eyka hjálp. Skúlastjórin tekur neyðugu stigini í samstarvi við flokslæraran, førleikastovuna og í serligum førum eisini í samráð við Sernám.

### I) Tímajáttan eftir § 5, stk. 6

Eftir § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini verða tímar játtaðir næmingum, ið ikki tosa føroyskt ella hava vantandi førleikar at samskifta á føroyskum, so at teir kunnu fáa eyka undirvísing í føroyskum máli. Ásetingin sigur, at næmingar, ið hava føroyskt sum seinna málið, kunnu í hóskandi vavi fáa serstaka undirvísing í føroyskum.

Henda ásetingin er breið og fatar bæði um skipan og tímar. Næmingarnir kunnu í hóskandi vavi fáa serstaka undirvísing, og tí er fyrst og fremst

6 *Sí Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, bls. 4-5. Gransking vísur, at í sambandi við at læra seg eitt annaðmál, er tað ein fyritreyt at hava eitt væl ment móðurmál.

talan um eina meting av tørvinum, og hvussu undirvísingin skal verða løgd til rættis og skipað. Lýstar verða nærri í § 4 og 5 í kunngerðini tær fyriskipanir, sum skúlin kann seta í verk.

Mannagongdin, ið nýtt verður í sambandi við at søkja um tímar, er, at skúlin ger eitt samlað yvirlit yvir næmingar, ið hava tørv á undirvísing í føroyskum sum annaðmál, og søkir í fyrsta lagi um tímar til teir næmingar, sum eru innskrivaðir 1. februar. Næmingar koma til Føroya ymiska tíð í skúlaárinum, og umráðandi er, at undirvísingin í føroyskum máli og mentan byrjar so skjótt sum til ber. Skúlin eigur tí at senda nýggja umsókn so hvørt fyri teir næmingar, sum verða innskrivaðir í skúlaárinum.

Skúlar, sum hava fleiri næmingar við tørvi á serstakari undirvísing í føroyskum, skulu skipa næmingabólkar eftir aldri og málsligum førleikum í føroyskum. Harumframt verður hædd tikin fyri tí móðurmáli, næmingarnir hava, og um teir m.a. duga at samskifta á enskum. Eisini kunnu hesir skúlar søkja um at byrja við einum móttøkuflokki eitt tíðarskeið, men meginreglan er tó altíð, at næmingurin hoyrir til ein heimaflokk, sí oyðublað, skjal 1. Ætlanin er at skipa móttøkuflokkar landafrøðiliga í økjum, men enn er skipanin ikki sett í verk.

## II) Skipan í sambandi við serstaka undirvísing í føroyskum

Tað eru ymiskir møguleikar at útinna hesa áseting í § 5, stk. 6 og møta teimum avbjóðingum, sum skúlin hevur í sambandi við at veita tvímæltum næmingum holla undirvísing. Talan er um eitt heildartilboð, har bæði fakligi og sosiali parturin verða tiknir við, umframt inklusjónshugtakið.

Tað er tí neyðugt, at skúlin í sambandi við umsóknina um tímar eisini hevur gjørt ætlan um, hvussu undirvísingartilboðið skal verða skipað, og hvussu næmingarnir verða bólkaðir. Næmingarnir koma í ymiskum aldri og eru ymiskt fyri málsliga, summir duga eitt norðurlendskt mál, aðrir ikki, summir duga enskt, aðrir ikki, summir duga eitt sindur av føroyskum, aðrir ikki. Fortreytirnar hjá næmingunum eru tí so umráðandi og avgerandi fyri, hvussu undirvísingartilboðið verður skipað.[7]

Skúlin eigur í síni fyriskipan at leggja dent á, at tað eru lærarar, sum hava serligan førleika og royndir at undirvísa tvímæltum næmingum, ið undirvísa og luttaka í arbeiðinum at skipa undirvísingina í einstaka skúlanum. Tímarnir verða frá skúlaársbyrjan lagdir í fasta legu í virksemisætlanini hjá viðkomandi lærara og í tímatalvuni hjá næminginum, sí eisini § 4- 6 í kunngerðini. Týðandi er at hava støðugar karmar, og at úrtøkan og trivnaðurin hjá næminginum regluliga verða eftirmett.

## III) Dømi um skipanir

1. **Undirvísing í flokkinum**
   Miðað eigur at verða eftir, at næmingurin í mest møguligan mun hevur tilknýti til tann flokkin, har hann er innskrivaður. Skipan verður gjørd, so at næmingurin við eyka hjálp kann fylgja undirvísingini í flokkinum og um neyðugt, at ein partur kann vera í næmingabólki uttan fyri flokkin saman við næmingum, sum hava líknandi førleika og avbjóðingar.

2. **Móttøkuflokkur og bólkaundirvísing**
   Ein møguleiki, sum ikki hevur verið so nógv nýttur í Føroyum, er móttøkuflokkur eitt tíðarskeið fyrstu skúlatíðina, til dømis í 3 mánaðir. Umstøður hava ikki rættiliga verið fyri hesum, men lærarar í føroyska fólkaskúlanum, sum hava starvast í Danmark, hava gott at bera skipanini við móttøkuflokkum.

   Ein móttøkuflokkur er á ongan hátt ein varandi skipan, men móttøkuflokkur kann verða partur av skúlabyrjanini, til næmingurin við hjálp kann fylgja vanligu undirvísingini. Samstarv eigur at vera millum lærararnar í móttøkuflokkinum og floks-

7 Tað hevur stóran týdning, at ein frá byrjan av tryggjar sær at hava allar viðkomandi upplýsingar um næmingin í sambandi við meting um at skipa undirvísingina av næminginum - sí part 2, bls. 14-15 um førleikameting/screening.



læraran, har næmingurin er innskrivaður, soleiðis at næmingarnir og flokstoymið eru fyrireikað til, at næmingurin verður partur av flokkinum.

Móttøkuflokkur kann eisini verða skipaður sum ein partur av skúladegnum, har næmingurin bæði er í móttøkuflokki og í sínum egna flokki. Tímatalið, ið næmingurin hevur ávikavist í móttøkuflokki og sínum egna flokki, verður lagt til rættis alt eftir fortreytunum hjá einstaka næminginum og næmingunum í móttøkuflokkinum.

3. **Einstaklingaundirvísing**
   Skúlin eigur at ansa eftir ikki at avbyrgja næmingin við ov nógvari einsæris undirvísing og líknandi átøkum. Men neyðugt kann vera at skipa fyri einstaklingaundirvísing í serligum førum. Í smáum skúlum, har bert ein tvímæltur næmingur er, kann verða gagnligt í samráði við flokstoymið at aðrir næmingar stuðla tvímæltum næmingum í eykaundirvísingini. Um eingin framgongd tykist í læringini, er neyðugt, at støðan verður viðgjørd í samráði við førleikastovuna. Í serligum føri setur skúlin seg í sambandi við Sernám at meta um støðuna hjá næminginum og gera tilmæli um, hvørji hjálp næmingurin hevur tørv á.

Í smærri skúlum er ikki líka lætt at skipa fyri móttøkuflokki. Tá er umráðandi, at skúlin fær møguleika at gera skipanir, sum hóska til umstøðurnar á staðnum. Á Eiði hevur skúlin nýtt fólk á staðnum, ið hava serligan førleika, tíð og møguleika at hjálpa til við ávísum uppgávum í sambandi við málmenningina, so sum at vísa næminginum runt í bygdini, greiða frá lívinum í bygdini og vitja ymisk støð í nærumhvørvinum.

## Førleikastovan

Allir skúlar hava antin egna førleikastovu ella samstarv við førleikastovu í øðrum skúla í nærumhvørvinum. Arbeiðsuppgávurnar hjá førleikastovuni eru fjølbroyttar og fevna bæði um at menna vanligu undirvísingina og sernámsfrøðiligu átøkini. Førleikastovan skal m. a.:

- samskipa námsfrøðiligu og sernámsfrøðiligu førleikarnar og átøkini í skúlanum,
- menna læruumhvørvið og menningarumhvørvið í skúlanum,
- miða eftir, at næmingarnir fáa neyðuga hjálp so tíðliga sum gjørligt,
- samskipa og gagnnýta servitanina, umframt at menna eitt gott læruumhvørvi og námsfrøðilig amboð og mannagongdir, og
- menna eitt næmingalagað og inkluderandi skúlaumhvørvi, har allir næmingar fáa møguleika at mennast og læra og fáa høvi at vera virknir í felagsskapinum.

Ein av høvuðsuppgávunum hjá førleikastovuni er at leiðbeina og ráðgeva lærarum í fakligum, námsfrøðiligum og sernámsfrøðiligum spurningum, og hetta er eisini galdandi fyri tvímæltar næmingar.

Fast knýtt at førleikastovuni eru sum meginregla: serlærari, sum er leiðari, umframt lesivegleiðari, AKT-lærari, orðblindalærari og støddfrøðivegleiðari. Harumframt eru allir aðrir fakpersónar, t.v.s. lærarar, sum hava eftirútbúgving á ávísum øki ella røkja serligar uppgávur, knýttir at førleikastovuni eftir tørvi. Bæði í sambandi við móttøku og at leggja til rættis, tá ið tvímæltir næmingar byrja í skúlanum, kann tað verða neyðugt at seta seg í samband við førleikastovuna, og eigur hetta at verða gjørt, tá ið ivamál eru um undirvísing og trivnað. Tað kann vera í sambandi við trivnað, sum er serkunnleikin hjá AKT-læraranum, í sambandi við at leggja lesingina til rættis, har lesivegleiðarin veitir ráð og hjálp, ella um næmingurin hevur serligar avbjóðingar, so kann tað bæði vera serlærarin og orðblindalærarin, sum vegleiða.[8]

## Ábyrgd skúlaleiðarans

Skúlaleiðslur hava ein serligan leiklut at skipa fyri so góðum umstøðum sum gjørligt til menning og hugsavnan hjá øllum næmingum. Fyri at tvímæltir næmingar kunnu fáa rætta stuðulin í málmenningini, skal leiðslan bera so í bandi, at allir lærarar arbeiða miðvíst saman um hesa uppgávuna. Tá er gott at hava eina greiða ætlan, har mál og partsmál verða sett fyri málmenningina.

Leiðslan skal tryggja gott ábyrgdarbýti millum lærarar og skal meta um, hvussu lærаratilfeingið best verður gagnnýtt í arbeiðinum við málmenning hjá næmingum. Harumframt er ein uppgáva hjá leiðsluni at tryggja, at játtaðu tímarnir til serstaka undirvísing í føroyskum verða nýttir so skynsamt sum gjørligt.

### Leiðslan hevur ein týðandi leiklut

- at stuðla læraranum
- at lærarar ikki uppliva at standa einsamallir í truplum støðum
- at virka fyri góðum trivnaði. Trivnaður viðvíkur øllum, og tað krevur samanhald at skapa og røkja trivnaðin í skúlanum

Tað er skúlaleiðarin, sum stendur á odda fyri einstaka skúlanum. Tá ið lógin nýtir orðingina *skúlin*, so er fyrsti ábyrgdarhavandi skúlaleiðarin, sum er skúlastjórin, fyrsti- ella einalærarin. Í talvuni niðanfyri, *Ábyrgd skúlaleiðarans*, er víst á ítøkiligar ásetingar í lógini um ábyrgdina hjá skúlaleiðaranum.

### Ábyrgd skúlaleiðarans

§ 3, stk. 1. Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans, smb. § 2, og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.

§ 3, stk. 2. Skúlin samstarvar við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.

8 Meginreglur fyri virkisøkið og arbeiðsuppgávurnar hjá teimum, ið eru knýtt at førleikastovuni, eru ásettar í kunngerð nr. 95 frá 2019 um førleikastovur.

§ 45, stk. 1. Leiðari skúlans ansar eftir, at allir teir næmingar, sum eru skrivaðir inn í fólkaskúlan, taka lut í undirvísingini.
§ 45, stk. 4. Skúlaleiðarin setur fyriskipan í verk fyri næmingar, ið hava serligar avbjóðingar, harímillum við atliti at sosialum felagsskapi, trivnaði og tilknýti. Stig kunnu verða tikin til, at næmingar verða fluttir í annan skúla ella í annað undirvísingartilboð.

§ 55, stk. 2. Skúlaleiðarin hevur ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av skúlanum og ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis skúlamyndugleikunum á staðnum.

§ 55, stk. 3. Skúlaleiðarin stýrir og býtir arbeiðið ímillum teirra, sum starvast í skúlanum, og tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingum skúlans.

*Úr fólkaskúlalógini*

## Flokslæraraskipan

Fólkaskúlin hevur eina flokslæraraskipan, sum hevur stóran týdning í sambandi við at taka ímóti næmingum og skapa umstøður fyri, at nýggir næmingar falla væl til í flokkinum. Arbeiðið fevnir millum annað um trivnaðararbeiði í flokkinum, lærarasamstarv, foreldrasamstarv og kunning til leiðslu og foreldur. Flokslærarin eigur altíð at vera við í arbeiðinum, tá ið næmingur, ið flytur til Føroya, verður innskrivaður í hansara flokk.

Arbeiðsøkið hjá flokslæraranum er ásett í kunngerð nr. 37 frá 2003 um flokslæraran. Flokslærarin megnar ikki alt einsamallur, og tí er flokstoymið eisini umráðandi, so at lærararnir í flokkinum draga somu línu og gera sítt til, at arbeiðið í flokkinum eydnast. Niðanfyri eru nøkur brot úr kunngerðini, sum vísa, hvussu týðandi flokslærarauppgávan er, ikki minst við atliti at sambandinum og samstarvinum við foreldrini. Til dømis hava avtalur, ætlanir og heimaarbeiði nógv at siga fyri relatiónir millum skúla og heim, eina vælskipaða skúlagongd og menning hjá næminginum. Leinki til kunngerðina er løgd hjá aftast, bls. 39.

### Flokslæraraarbeiði

Flokslærarin hevur ábyrgdina av at samskipa floksins arbeiði og taka hond um trivnaðin hjá einstaka næminginum. Flokslærarin er umboðsfólk floksins í samskiftinum og samstarvinum við leiðslu og lærarar. Flokslærarin skal í samráð við leiðsluna skipa samarbeiðið millum skúla og heim.

Flokslærarin skal í minsta lagi eina ferð um árið, og annars tá skúlaleiðarin biður um tað, kunna leiðsluna um flokkin og einstøku næmingarnar í flokkinum, herundir um fakliga førleikan, arbeiðsgongdina og trivnaðin hjá barninum.

Flokslærarin hevur í samráð við foreldur og lærarar floksins ábyrgdina av skrivliga at boða skúlaleiðsluni frá, um tørvur er á at tilmelda næming, sum hevur tørv á serligum undirvísingarligum ella sernámsfrøðiligum tiltøkum.

Flokslærarin skal javnan og í minsta lagi 2 ferðir um árið kunna heimini um fakliga førleikan, arbeiðsgongdina og trivnaðin hjá barni teirra.

Flokslærarin hevur skyldu til at boða foreldrum frá, um hann er varur við, at barn teirra mistrívist ella hevur trupulleikar í skúlanum. Foreldur ella verjar hava rætt til at biðja flokslæraran um kunning og vegleiðing um fakliga førleikan, arbeiðsgongdina og trivnaðin hjá barni teirra.

Tann einstaki næmingurin hevur rætt til at fáa ráð og vegleiðing um faklig og trivnaðarlig viðurskifti frá flokslæraranum.

*Brot úr kunngerðini*



# MÓTTØKA, SKÚLABYRJAN OG TRIVNAÐUR

**Í hesum partinum, ið serliga snýr seg um trivnað og fyrstu tíðina í skúla, skal tað snúgva seg um hesi viðurskifti:**

- Móttøka og ábyrgd skúlaleiðarans
- Móttøka, byrjanarsamrøða, at lýsa førleikar og áhugamál næmingsins (screening)
- Trivnaður
- Mennandi hugburður
- Stórar væntanir – ikki lítlar

Menning, læring og trivnaður hanga saman. Um tvímælti næmingurin ikki mennist og lærir, er skjótt vandi fyri, at útlitini fyri góðum trivnaði versna.[9] Tað er tí av stórum týdningi, at skúlin fyrireikar eina góða móttøku, tá ið næmingur byrjar í skúla, óansæð um næmingurin møtir við almennu skúlabyrjanina ella byrjar miðskeiðis í skúlaárinum. Tað besta er, at næmingurin fær eina væl fyrireikaða skúlabyrjan og støðugt lærir og mennir føroyska málið øll skúlaárini.

## Móttøka og ábyrgd skúlaleiðarans

Skúlaleiðslur hava ábyrgd av at skipa so fyri, at umstøðurnar til menning og læring hjá øllum næmingum eru so góðar sum gjørligt. Sum liður í arbeiðinum at veita tvímæltum næmingum rætta stuðulin í málmenningini er umráðandi, at skúlin hevur eina greiða ætlan, har mál og skipan verða sett fyri málmenningina. Leiðslan skal í hesum sambandi skipa fyri, at allir lærarar arbeiða miðvíst saman um hesa uppgávu, tí føroyskt er partur í øllum lærugreinum, m.a. at seta orð á og skilja týdningin, ið heiti og málburður hava á føroyskum. Leiðslan eigur at leggja dent á, at tað eru góðir karmar fyri lærara- og toymissamstarvi, har lærarar í støddfrøði, alis- og evnafrøði, søgu, landalæru, ítrótti og aðrir lærarar eisini hjálpa til í málmenningini.

## Móttøka

Móttøkan er ein týðandi partur, sum skúlin eigur at fyrireika, so tað ikki hendir, at ein nýggjur næmingur byrjar í skúlanum, og hvørki næmingar ella lærarar eru fyrireikaðir til, at næmingurin skal koma í teirra flokk. Ein góð móttøka er umráðandi fyri allar næmingar, ið byrja sum nýggir næmingar í einum skúla, og ikki minst fyri tilflytarar, sum ikki duga okkara mál og hvørki kenna okkara samfelags-normar ella mentan.

9 Sí *Styrk sproget*, bls. 40.

Vit hugsa kanska ikki altíð um, hvussu stóran týdning móttøka og skúlabyrjan hava. Tað hevur nógv at siga fyri skúlagongdina hjá nýggjum næmingum, at móttøkan er góð og at skúlabyrjanin er væl skipað. Tilflytarar koma úr nógvum ymiskum londum, og umframt at teir koma til eitt øðrvísi samfelag og annað veðurlag, so skulu teir læra eitt nýtt mál, finna nýggjar vinir og liva í eini aðrari mentan. Øll hesi viðurskifti kunnu hava sínar avbjóðingar. Til dømis hava lærarar víst á, at siðvenja er ikki, at næmingar reisa seg, tá ið lærari ella skúlastjóri kemur inn í flokkin. Hetta er annars vanligt í nógvum londum, og bara hetta kann gera, at næmingurin skilir seg frá hinum, hini flenna og næmingurin er illa við. Tað eru sovorðnar smálutir, sum eisini hava týdning at kunnað verður um.

Lærarar hava gjørt sær nógvar royndir gjøgnum árini, og teimum eiga vit at lurta eftir og læra av, men sjálvsagt kunnu umstøðurnar verða ymiskar, eisini frá býi til bygd, har øll kenna hvørt annað. Tað eru tó nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum skúlin eigur at hava í huga, áðrenn næmingurin byrjar í skúlanum.

### Meginreglur í sambandi við móttøku og skúlabyrjan

- Byrjanarsamrøða við foreldrini og næmingin, har flokslærarin og lærarin, sum undirvísir í føroyskum sum annaðmál, luttaka.
- Næmingur og foreldur fáa høvi at síggja skúlan og verða kunnað um mannagongdir í skúlanum, so sum fráboðan til foreldrini, heimaarbeiði, foreldrasamrøður, matpakka, morgunsang og annað, sum er viðkomandi hjá foreldrum og næminginum at vita.
- At lýsa førleikar og áhugamál næmingsins (screening).
- Flokslærarin kunnar næmingarnar um, at ein nýggjur næmingur byrjar í flokkinum og viðger, hvussu flokkurin á besta hátt tekur ímóti næminginum. Hetta kann eisini vera partur av atferðarreglunum.
- Flokslærarin setur tveir næmingar at verða mentorar hjá nýggja næminginum.
- Flokslærarin kunnar hinar lærararnar, og avtala verður gjørd millum lærararnar um, hvussu undirvísingin verður skipað fyrstu tíðina, og hvussu undirvísingin í føroyskum sum annaðmál verður løgd til rættis (sí eisini 3. part, bls. 23-28).
- Fylgt verður við gongdini. Leiðslan verður kunnað og stig tikin til, um serlig viðurskifti eru, sum skulu verða havd í huga.

### Byrjanarsamrøða

Skúlin skal virka fyri at byrjanarsamrøðan við næming og foreldur verður hildin, áðrenn næmingurin byrjar í skúlanum. Samrøða eigur at vera við næmingin og foreldrini, áðrenn næmingurin byrjar í skúlanum. Hetta er ein liður í móttøkuni og í arbeiðinum at fyrireika bæði næming og foreldur til føroyska skúlan, so at barnið kann fáa eina so góða skúlabyrjan, sum til ber. Skúlin fær viðkomandi upplýsingar um barnið og familjuna, t.d. um næmingurin hevur havt serligar upplivingar, ið skúlin eigur at verða kunnaður um. At kenna til styrkir og áhugamál hjá næminginum er serliga viðkomandi í sambandi við at leggja undirvísingina til rættis, og er hetta góð vitan hjá læraratoyminum. Um næmingurin hevur onkran serligan førleika, so eiga skúlin og næmingurin at kunna nýta hetta, serliga fyrstu tíðina, bæði í tilelvingini og í møti við flokkin.

Upplýsingar um frítíðaráhugamál eru eisini viðkomandi at kenna bæði í sambandi við undirvísingina og við at eggja til, at barnið fær høvi at ganga til eitt nú ítrótt ella annað frítíðartilboð á staðnum.

Tað er umráðandi at leggja dent á at hava gott

huglag. Talan kann vera um eina heldur strongda tíð hjá næmingi og familju við stórum broytingum. Haldið samrøðuna heldur meiri óformliga, enn formliga og álvarsliga.

Ein byrjanarsamrøða er neyðug, og tulkur skal vera brúktur, um t.d. pápi, mamma ella næmingurin ikki skilur tað, ið tosað verður. Útlendingastovan veitir ráðgeving í sambandi við at bíleggja tulk.

Til samrøður, og serliga til samrøður, har tulkur verður nýttur, er tað eitt gott hugskot, at flokslærarin hevur ein starvsfelaga aftrat sær at gera notat. Tá er lættari hjá flokslæraranum at hugsavna seg um sjálva samrøðuna og um at vera nærverandi. Leggið eina ætlan fyri samrøðuna og leggið dent á bæði byrjan og enda, so tað verður eitt viðkomandi samskifti. Í Halse skole í Stjørdal í Noregi er ein skipan við eini samrøðu, tey kalla *inntakssamtale*. Her liggur samrøðan stutt undan fyrsta skúladegi, eini tveir ella tríggjar dagar frammanundan. Fyrsta skúladag er ein lærari settur til at taka ímóti fyrsta dagin, t.e. sami lærarin, sum hevði byrjanarsamrøðuna. Síðani er tað ein næmingur úr flokkinum, sum fær ábyrgd av at koma eftir næminginum í matarsteðginum og vera saman við næminginum í fríkorterunum hendan fyrsta dagin.[10]

Upplýsingar skulu verða goymdar á hóskandi hátt og brúktar av lærarunum, sum hava við tvímælta næmingin at gera. Hetta skal verða fyriskipað av skúlaleiðsluni, og í skúlanum skulu vera mannagongdir um, hvussu hetta best verður gjørt. Vit eiga at hava í huga, at lærarin í støddfrøði og ítrótti er eisini mál-lærari í føroyskum hjá tvímælta næminginum. Hetta er ein felags ábyrgd hjá læraratoyminum.

Tað kann vera meiri og minni tørvur á byrjanarsamrøðu, tá ið tvímæltur næmingur byrjar í skúla. Men trupult er at vita frammanundan, júst hvør tørvurin er, og fleiri upplýsingar kunnu vera sera viðkomandi hjá lærarum fyrstu tíðina. Tí er týdningarmikið at virða hetta amboðið og brúka tað.

## At lýsa førleikar og áhugamál næmingsins

At lýsa førleikar og áhugamál næmingsins, ofta nevnt *screening*, skal ikki undirmetast í sambandi við skúlabyrjanina og fyrstu tíðina, næmingurin er í skúla og skal fóta sær í einum nýggjum umhvørvi og gerast partur av einum skúlaflokki. Hetta skal síggjast sum natúrligur partur av eini vælskipaðari móttøku og skúlabyrjan hjá næmingi, ið nýliga er fluttur til landið. Hædd eigur eisini at verða tikin fyri hesi samrøðuni í sambandi við tímajáttanina til skúlarnar til undirvísingina í føroyskum máli og mentan.

Aðrastaðni eru gjørdar ítøkiligar royndir og mannagongdir, ið vit kunnu nýta sum íblástur, m.a. nýggja tilfarið frá danska kenslumálaráðnum frá oktober 2017: *Hele vejen rundt om elevens sprog og ressourcer – afdækning af nyankomne og øvrige tosprogede elevers kompetencer til brug i undervisningen* og leiðbeinandi tilfarið *Information til skoleledelse og kommunal forvaltning*. Vit hava umframt hetta testir, sum verður gjørdar í sambandi við byrjanarundirvísing í føroyskum og í sambandi við orðblindi til at meta um tørvin á serstakari undirvísing í føroyskum.

Sum íblástur til førleikametingina verður víst til danska tilfarið: Hele vejen rundt om elevers sprog og ressourcer, sí meira á: https://emu.dk/grundskole/saerlige-elevgrupper/hele-vejen-rundt-om-elevens-sprog-og-ressourcer

Víst verður eisini til norskt tilfar, sí: https://nafo.oslomet.no/grunnskole/skole-hjem/#Et_godt_forste_mote_med_skolen.

10 Sí videobrot, dømi: https://sprakloyper.uis.no/barnetrinn/flerspraklige-elever/nyankomne-minoritetsspraklige-elever/mottak-av-nyankomne-elever/inntakssamtale-nyankomne-elevers-mote-med-skolen-article114166-21017.html?articleID=114166&categoryID=21017. Sí eisini www.sprakloyper.uis.no og fylg hesum yvirskriftum: *barnetrinn, flerspråklige elever, Nyankomne minoritetsspråklige elever* og fylg síðan vegleiðingini á síðuni, pakkarnir 1-5 (tekstur, uppgávur og videobrot).

# Trivnaður

Trivnaður hevur alstóran týdning í øllum tí, vit fáast við. Hetta er ikki minst galdandi fyri børn, tí tey eru í stóran mun knýtt at tí, ið tey vaksnu siga og gera. Tað er so umráðandi, at næmingarnir kenna, at lærararnir hava umsorgan fyri teimum, og at næmingarnir kenna seg sum part av felagsskapinum í flokkinum. Trivnaður kemur ikki av sær sjálvum, men er eitt evni, vit mugu arbeiða við, har øll geva sítt íkast og verja um virðini og felagsskapin. Trivnaður er huglagið í flokkinum, arbeiðslagið og fakligu avbjóðingarnar. Fólkaskúlin hevur eina stóra uppgávu, har flokslæraraarbeiði og lærarasamstarv eru týðandi tættir. Flokkar eru ymiskir, men tað eru nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum skúlin eigur at leggja seg eftir, sí niðanfyri.

### Viðurskifti, ið ávirka trivnað

- At virka fyri trivnaði og fyribyrgja møguligari happing.
- At næmingarnir kenna seg javnsettar, og allir næmingar hava somu rættindi og møguleikar at sleppa framat og hava orðið.
- At virka fyri, at næmingar ikki keða seg, sum kann vera vegna ov lítlar fakligar avbjóðingar, at teir ikki megna at fylgja við í undirvísingini, ella ikki skilja tað, sum sagt verður og møguliga hava tørv á øðrvísi arbeiðsháttum.

## Fólkaskúlalógin og trivnaður

Nógv verður gjørt í skúlunum fyri at skapa trivnað og eitt gott læruumhvørvi. Í fólkaskúlalógini verður orðið *trivnaður* ikki brúkt beinleiðis, men verður nevnt í sambandi við, at skúlastýrið ger meginreglur fyri virksemi skúlans m.a um trivnaðarætlanir. Hóast hetta, so eru nógvar ásetingar, sum umrøða týðandi viðurskifti fyri trivnað, at fyrilit verða tikin fyri einstaka næminginum, og at hann verður tikin við upp á ráð. Endamálsorðing fólkaskúlans er ein heildarfatan av læringini og læruumstøðum næmingsins, umframt týdninginum av samstarvinum við foreldur. Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin sambært § 3 ábyrgdina av undirvísingardygdini og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.

Tá ið tað í § 3 verður víst til *innan fyri settar karmar*, so eru tað umframt fólkaskúlalógina kunngerðir, rundskriv, reglur, ársætlanir og tímajáttanin, sum áseta karmarnar, ið skúlin hevur at virka eftir. Tá hava vit ikki umrøtt hølisviðurskiftini, amboð og tilfar, sum kommunurnar hava ábyrgdina av, og sum hava sera stóra ávirkan á undirvísingarliga umhvørvið í skúlunum. Somuleiðis uttandura økið í skúlunum og møguleikar fyri uppihaldsstøðum innandura í fríløtunum.

### Endamálsorðing fólkaskúlans (§ 2, stk. 1-3)

Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúphugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra,

og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling.

Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna.

> Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag.
>
> Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

Ein onnur týðandi áseting í hesum sambandi er § 21, har sagt verður, at *Ráðleggingin av undirvísingini, herímillum valið av undirvísingarhættum, undirvísingarmiðlum og evnum, skal megna tað, sum ásett er í endamálsgrein fólkaskúlans, og vera lagað til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum og samsvarandi ásettum málum.*

Eisini verður í somu grein víst á, hvussu stóran týdning lærarasamstarvið hevur, og at næmingarnir verða tiknir við upp á ráð: *Tað áliggur leiðslu skúlans at tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar.*

*Á hvørjum floksstigi og í hvørji lærugrein samarbeiða lærarar og næmingur javnan um at áseta tey mál, roynt verður at náa. Arbeiði næmingsins verður lagt til rættis við atliti at hesum málum. Ásetingin av arbeiðsformum, -háttum og evnisvali skal í mestan mun fara fram í samstarvi millum lærararnar og næmingarnar.* Ásett verður eisini í § 21, stk. 5, at: *Til hvønn flokk verður settur ein flokslærari at loysa serstakar uppgávur flokkinum viðvíkjandi.*

## Trivnaður sum fortreyt fyri læringini

Við atliti at evninum *trivnaður* hjá næmingum, ið læra nýtt mál, er tað sera umráðandi, at umhvørvið er stuðlandi og hevur ein mennandi og skynsaman hugburð. Heitið trivnaður kann lýsast á ymiskan hátt, men kann eisini fevna um fleiri hugtøk og viðurskifti. Tá ið vit tosa um børn og skúlagongd, so er neyðugt at taka fleiri viðurskifti við, tí vit tosa um eitt tíðarskeið, ið vanliga fevnir um fleiri ár.

Vit knýta her niðanfyri evnið *trivnaður* saman við spurninginum: *Hvat skal til fyri at læra?*, sum Gitte Klein umrøddi í fyrilestri á vári 2019 í sambandi við verkætlanardagarnar, har nomið varð við hesi fyribrigdi í sambandi við trivnað sum fortreyt fyri læringini.

### Trivnaður sum fortreyt fyri læringini

Hesir faktorar eru avgerandi fyri hugtakið ella fyribrigdið *trivnaður:* Positivar kenslur, áhugi, nærlagni, skyldskapur, relatiónir, meining og avrik.

Týðandi viðurskifti annars:

**Játtanarskeivleiki**
Sálarfrøðin vísir á, at menniskjað hevur ein *játtanarskeivleika*, ið ger, at vit mugu venja okkum við at síggja tað positiva og møguleikar í lívsins viðurskiftum, ið kunnu virka avbjóðandi.[11] Tað vil siga, at tað ringa er sterkari enn tað góða, og tað jaliga vigar lutfalsliga minni enn tað neiliga. Neiligar tulkingar og eygleiðingar eru sterkari enn tær jaligu, so sum rós og vónríkur hugburður. Vit mugu tí tilvitað og virkin velja at órógva hesar vanar og metingar. Av somu orsøk liggur tað serliga á skúlaleiðslum at arbeiða fyri góðum mannagongdum.

**24 styrkir (*positiv læring*)**
*Men hvussu tá?* Kanst tú spyrja – hvør er besta leiðin at koma á tað góða arbeiðslagið? Jú, tað er við at brúka styrkirnar hjá næmingunum. Tvørtur um heimsmentanir finnast 24 ymiskar styrkir, ið vit øll hava sum eginleika. Hesar styrkir kunnu virka orkugevandi og kunnu beina okkum á eina góða leið til menning. Til dømis forvitni og áhaldni eru styrkir, ið vit kunnu hava meiri og minni av. Styrkir kunnu brúkast í sambandi við undirvísing og fyri at fáa gongd á.

11 *Mennandi Sálarfrøði*, Gitte Klein og Ann-Britt Fríðheim Mortensen, Nám, 2018, bls. 59-71, sí eisini bls. 83-99 um styrkir og positiva læring.



Til dømis kann ein heldur leggja dent á styrkir hjá næmingum enn met. Hetta økir um trivnaðin í flokkinum, um sambandið millum næmingar og millum næmingar og lærarar og skapar tolsemi og læring.

**Relatiónir – at kenna seg aftur í**
Raðfestið sosialisering í gerandisdegnum í mun til mannagongdir. Hetta er eisini fyri at beina leiðina inn á tað fakliga og fyri at læra málið. Í dagsins samfelag við sosialum miðlum og nýggjum samskiftisháttum, t.d. við ymiskum appum, er einsemi, hóast alt hetta, eitt vaksandi fyribrigdi. Sambært kanning í Danmark eru 25.000 næmingar, ið siga seg vera ov einsamallar, t.e. kenna seg hvørki at hava samband við vinir ella lærarar.[12]

Virðismetið og raðfestið andlit til andlitsrelatiónina við at skapa góðar umstøður fyri hesum slagi av samspæli/relatión!

**Hin rætti hugburðurin til læring – mennandi ella læstur hugburður**
Næmingar skulu hava avbjóðingar fyri at mennast. Avrik geva eina góða kenslu, og næmingur fær lættari eina kenslu av at hoyra til fakliga felagsskapin. Av somu grund skulu væntanir til næmingin og mál fyri undirvísingina ikki verða sett lágt, men heldur høgt. Dentur skal verða lagdur á, at heilin ikki er ein beinagrind, men ein vøddi, og at læring snýr seg um eina tilgongd.

Tá ið tað ikki gongur væl, er umráðandi at ansa eftir, at hugurin at læra ikki hvørvur. Her er talan um eitt fyribrigdi, ið nevnt verður *lært hjálparloysi*. Í hesum førum hevur næmingurin roynt okkurt nakrar ferðir, men tað hevur ikki hepnast við tí, hann skuldi gera. Hetta kann í mongum førum elva til eina kenslu hjá næminginum, at tað er líkamikið, hvat eg geri, eg dugi tað ikki kortini. Í slíkum støðum við lærdum hjálparloysi er motivatiónin ikki til staðar at broyta støðuna, og sostatt stendur tú hendur í favn. Tvímæltir næmingar kunnu koma í ta støðu, at teir nakrar fáar ferðir ikki hava skilt undirvísingina ella uppgávurnar og sostatt hava givið upp. Lært hjálparloysi uppliva vit eisini í sosialum viðurskiftum. Tí er tað sera umráðandi at vera varugur við lært hjálparloysi hjá næmingunum, ikki minst tvímæltum.

Orðið "enn" er eitt gott orð at nýta: *eg dugi hetta ikki "enn", men eg eri í ferð við at læra tað*... At trívast í tilgongdini er týdningarmikið. Næmingarnir skulu eisini kenna til *mennandi hugburð*, ella sokallaða *Growthmindset, sí næstu blaðsíðu*.

12 *Elevernes fællesskab og trivsel i Skolen – analyse af den nationale trivselsmåling 2017*. Dansk Center for Undervisningsmiljø.



## Mennandi hugburður[13]

- Hjálpið børnum at skilja, at heilin virkar sum ein vøddi, sum einans kann styrkjast og vaksa við at arbeiða hart og við nógvum venjingum.
- Sigið ikki við børnini, at tey eru *dugnalig* ella *klók*, tí tað kann geva teimum eina fatan av, at tey eru fødd við hesum førleikum. Hetta virkar ikki fyri einum betri arbeiðslagi og øktum arbeiðsavriki.
- Rósið teimum, tá ið tey hava gjørt eitt arbeiði – t.d. tá ið tey hava kýtt seg, hóast tað hevur verið trupult at loyst uppgávuna.
- Rósið avrikinum. Óansæð hvussu byrjanarstøðið hjá barninum er, so er tað einans gjøgnum avrikið og venjingina, at børn nýta síni bestu evni og gávur.
- Rósið ikki úrslitunum sjálvum. Ein karakterur ella líknandi er ein endurspegling av menningini hjá barninum og tí, sum barnið lærir, og er ikki eitt mál í sjálvum sær.
- Minnist til at síggja møguleikar í mistøkum og royndum, ið miseydnast! Børnini skulu vita, at eitt mistak er ein stórur partur av tilgongdini at læra, og at mistakið hevur fingið tey víðari í tilgongdini.
- Latið børnini arbeiða saman. Børn læra best, tá ið tey eru hugsavnað í eini uppgávu og kunnu fáa og geva hugskot hvørt frá øðrum.
- Málið skal heldur vera førleikamenning enn at raka júst á tað rætta svarið. Stimbrið áhugan hjá børnunum fyri ávísum evnum við at greiða frá, hví tað er týdningarmikið, og hvussu hesir førleikar kunnu hjálpa teimum í longdini.

**Alt eftir, hvussu næmingar hugsa um vitið, ávirkar tað onnur lívsøki.[14] Tey, sum hava ein mennandi hugburð, síggja vitið sum broytiligt, og at tað loysir seg at arbeiða miðvíst fyri at gerast dugnaligari. Tey, sum hava læstan hugburð ella fixed mindset taka ikki við avbjóðingum, tí tey stúra fyri at gera feilir, og at tey ikki megna uppgávuna. Hugburðurin kann elva til, at tey ikki taka við menningarmøguleikum, ið standa teimum í boði. Um næmingur er ómotiveraður, órógvar og ger lítið í skúlanum, kann tað vera tí, at hann hevur læstan hugburð.**

**Barnið fær ein mennandi hugburð við at vera partur av einum umhvørvi, har tað er í lagi at gera mistøk, og har barnið fær áræði at royna enn einaferð og soleiðis gerast enn dugnaligari. Við at rósa barninum, tá ið tað gevur sær stundir at arbeiða við uppgávuni, heldur enn úrslitinum, lærir barnið, at tað er í lagi at stríðast fyri at koma á mál, og torir soleiðis at taka við avbjóðingum. Tað hevur sostatt stóran týdning at vera ágrýtin og arbeiða hugagóð.**

13 Sí *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, bls. 7, "Growth-Mindset".
14 *Mennandi sálarfrøði*, bls. 139-151.

### Virksemið og árið runt

Tá ið arbeitt verður við felagsskapi og trivnaði, eru ein røð av tiltøkum, sum eru viðkomandi, og sum skúlin kann nýta í sínum arbeiði. Hetta kann fata um tiltøk, ið skúlin skipar fyri sum sosiala samveru í flokkinum, næmingabólkar, foreldrasamstarv, hugnaløtur og fyriskipanir, ið skúli og skúlastýri seta í verk við atliti at trivnaðarætlanini og samstarvinum millum skúla og heim. Í hesum arbeiði og átøkum ræður um, at skúlaleiðslur og ábyrgdarpersónar, so sum flokslærarin, hugsa um tvímæltar næmingar, ið kunnu hava tørv á serligum umhugsni, t.d. næmingar, ið júst eru byrjaðir í skúlanum, og næmingar sum heild, ið hava vantandi málførleika at samskifta á føroyskum. Niðanfyri eru dømi um átøk í sambandi við trivnaðararbeiði, kunning og samstarv.

### Yvirlit yvir trivnaðarátøk og samstarvsskipanir

| Felags upplivingar | Samstarv og samvera |
|---|---|
| Seturskúli | Samstarv millum skúla og heim |
| Útferðir | Foreldrafundir |
| Vitjanir, m.a. stovnar, søvn, virki | Foreldraviðtalur |
| Hugnakvøld fyri næmingar | Hugnakvøld, har foreldur luttaka |
| Evnisdagar | Fyrilestrar |
| Jóla- og føstulávintshald | Jóla, føstulávints- og onnur hald |

### Føðingardagar og vinabólkar

Umframt omanfyri umrøddu átøk hevur tað stóran týdning at umrøða føðingardagar og vinabólkar, bæði í sambandi við næmingar, sum nýliga eru komnir til Føroya og ikki megna at samskifta á føroyskum, og nýggjar næmingar sum heild í skúlaflokkunum.

Tað er avmarkað, hvussu langt skúlans ávirkan røkkur í hesum førum. Tað eru foreldrini, sum halda føðingardagar fyri børnum sínum, og tað kann verða rættiliga ymiskt, hvussu føðingardagarnir verða skipaðir, og eisini um føðingardagurin er fyri allan flokkin, ella um gentur bjóða gentum, og dreingir bjóða dreingjum.

Næmingur úr øðrum landi og við øðrum tungumáli kann vera rættiliga einsamallur í slíkum støðum, um hann ikki kennir flokkin ella hevur onkran í flokkinum, sum hann fylgist við. Foreldrini hjá næminginum vita kanska heldur ikki, hvat tey skulu gera, fyri at næmingurin skal føla seg væl, um tey ikki eru kunnað um støðuna frammanundan.

Hetta sama kann í vissan mun gera seg galdandi í vinabólkum, men støðan er nakað øðrvísi, tí tað er skúlin, sum skipar vinabólkar, og tað eru fáir næmingar í hvørjum vinabólki. Eisini eiga umstøðurnar at verða tryggari í tann mun, at foreldrini eru til staðar og skulu skipa karmarnar kring bólkin og skulu ikki hugsa um mat og borðreiðing á sama hátt sum í einum føðingardegi.

Tað er umráðandi, at føðingardagar og vinabólkar eru partur av samstarvinum millum skúla og heim, og at flokslærarin og flokstoymið viðgera evnið á foreldrafundi. Nógvir flokkar hava eisini foreldraráð, og er hetta eitt gott forum at viðgera tílík mál sum føðingardagar, telduspøl, heimaarbeiði, frítíðarvirksemi og songartíð og seta felags mál, so foreldur draga somu línu. Skúlin ger eisini saman við skúlastýrinum meginreglur um ymisk viðurskifti, so sum trivnað og foreldrasamstarv.

## Stórar væntanir – ikki lítlar

Í donskum leiðbeiningartilfari til ábyrgdarar á skúlaøkinum verður evnið *stórar væntanir mótvegis lítlum væntanum* viðgjørt.[15] Rátt verður til at leggja undirvísingina soleiðis til rættis, at møguleiki er hjá øllum næmingum at taka lut og nema sær kunnleika á jøvnum føti, sum t.d. verður gjørt við at næmingalaga undirvísingina og seta týðilig mál og partsmál í undirvísingini.

Eisini skulu flokslærarin og læraratoymið leggja dent á foreldrasamstarv, so at øll foreldur kunnu

15 *Styrk sproget*, bls. 40.

stuðla undir læringina hjá børnunum. Tað stuðlar trivnaðinum og læringini, at lærarar hava góðar relatiónir til næmingarnar og ein virðurkennandi hugburð, so at allir næmingar kenna seg væl, virðismettar og fáa hóskandi avbjóðingar.

Fyri at kunna gera arbeiðið skynsamt hevur tað, sum áður nevnt, týdning, at lærarin hevur neyðugar upplýsingar um barnið. Umráðandi er, at foreldur greiða skúlanum frá týðandi upplýsingum, so at skúlin fær tikið væl ímóti barninum og skipa undirvísingina so skynsamt sum til ber. Harumframt verður dentur lagdur á, at skúlaleiðslur skulu gera sær ómak at seta lærarar við viðkomandi royndum og førleika at undirvísa tvímæltum næmingum.

Í grannalondum okkara hevur tað víst seg, at lærarar og námsfrøðingar hava væntað minni av tvímæltum næmingum enn øðrum næmingum, og hetta hevur havt ávirkan bæði á trivnað og avrik.[16]

Umráðandi er at virka fyri, at næmingarnir kenna, at skúlin hevur stórar væntanir til teirra avrik, tí at royndir vísa, at tá ið lærarar og umhvørvið annars hava heldur lítlar væntanir til næmingar, so kemur hetta teimum aftur um brekku. Børn skulu hava avbjóðingar, tó ikki so stórar, at tær ikki kunnu røkkast.

### Góð ráð, ið leiðslur á skúlum eiga at geva serligan ans

- Ansið eftir ikki at seta ov lág mál, men setið heldur høg mál! Havið samstundis fortreytirnar hjá tí einstaka í huga, tí tær ávirka bæði trivnaðin og læringina.
- Brúkið rætta læraratilfeingið, bæði í mun til verandi starvsfólkahóp og í sambandi við starvssetanir (sí *Styrk sproget*, bls. 11).
- Verið varug við vandarnar fyri útihýsing, ið kann stava frá manglandi málførleika hjá næmingi.
- Setið týðilig mál bæði fyri málsligu læringina og fakligu málini – saman við greiðum væntanum og afturboðan.
- Verið greið um, at týðiligt samskifti um væntanir hjá skúlanum til bæði næmingar og foreldur kann vera við til at skapa tryggleika og fremja trivnað.[17]

Í danska tilfarinum *Organisering af folkeskolens undervisning af tosprogede elever* verða hesir faktorar tiknir fram sum týðandi í málmenningini hjá einstaka næminginum:

- fortreytir og aldur hjá einstaka næminginum
- vinalagssamband í skúla og frítíð
- móðurmálið hjá næminginum
- heimið og alt umhvørvið hjá næminginum
- fyriskipan av skúlans undirvísing og tilfeingi[18]

Tað er umráðandi hjá einstaka skúlanum at umhugsa, hvussu vit á besta hátt taka ímóti og undirvísa næmingum við øðrum móðurmáli enn føroyskum. Hetta er ein avbjóðing. Skúlarnir hava royndir, vitan og mannagongdir, ið skapa trivnað og góðar umstøður fyri menning. Eins og í øðrum uppgávum í skúlanum, so hanga fleiri lutir saman: karmar, játtanir, mannagongdir og trivnaður.

16 *Styrk sproget*, bls. 8. Sí eisini Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever, bls. 7.
17 *Styrk sproget*, bls. 40
18 *Organisering af folkeskolens undervisning af tosprogede elever*, bls. 9.



# AT SKIPA UNDIRVÍSING OG DØMI UM UNDIRVÍSINGARHÆTTIR

**Í hesum parti, sum snýr seg um at skipa undirvísingina, verða hesi evni viðgjørd:**

- Skúlagongd krevur eisini fakmálsligar førleikar
- Tríggir undirvísingarhættir

Tilfarið í hesum parti um undirvísing og undirvísingarhættir tekur í stóran mun støði í danska tilfarinum *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, sum danska kenslumálaráðið saman við øðrum gav út í 2017. Tað er serliga tilfarið á blaðsíðu 8-11, ið verður nýtt sum grundarlag. Viðmerkjast skal tó, at vit leggja okkum eftir eini breiðari tilgongd til evnið og taka allar aldursbólkar í fólkaskúlanum undir einum.

## Skúlagongd krevur eisini fakmálsligar førleikar

Lærarar standa ofta við spurningum sum: *Hvussu kann eg best stuðla málmenningini í føroyskum hjá næmingum, ið eru tvímæltir? Hvussu kann eg undirvísa í t.d. landalæru, støddfrøði og søgu, tá ið næmingum vanta grundleggjandi orð í teirra orðfeingi?* og við øðrum líknandi spurningum?

Gransking vísir, at tess meira stimbrandi málumhvørvið hjá børnum er, tess betur læra tey mál.[19] Hetta er í enn størri mun galdandi fyri børn, ið skulu læra seg tvey mál. Ikki minni týdning hevur málumhvørvið í heiminum hjá barninum, ið lærir seg tvey mál, og tí er samstarvið millum heim og skúla av allarstørsta týdningi.

Børn hava brúk fyri málsligari ávirkan, sum tey síðan nýta til at byggja málið upp frá grundini av. Tey skulu læra at skyna á reglunum, sum galda í málinum, at úttala orðini, skilja merkingar og grammatisku reglurnar. Hetta er galdandi fyri øll børn, ið læra mál, eisini tey, ið læra seg eitt annað mál á ungum árum. Og tað ber væl til, tí at mál nýtast ikki at forða hvørjum øðrum. Hesar staðfestingar kann skúlin kunna foreldur um tíðliga í tilgongdini:

- Tað er ongantíð ov seint at læra seg málførleikar í øðrum máli.
- Málførleikin í øðrum máli er tongdur at góðum lærimøguleikum í málumhvørvinum hjá barninum.
- Móðurmálið og málførleikin í øðrum máli eru ikki kappingarneytar, men kunnu vaksa lið um lið. Hetta hóast tvímælt ongantíð kunnu ella skulu virka málsliga sum tveir einmæltir í sama persóni.

Faklig menning snýr seg í longdini um meira enn at avkota ein tekst og lesiførleika, men harumframt førleikan at skilja og greina ein tekst, at samanbera og at arbeiða við tekstum og tekstasløgum.

Í skúlanum verða krøv sett til málførleika, skrivliga

19 *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, bls. 5.

og munnliga – ikki bara gerandismál, men eisini til fakmál, ið til dømis verður brúkt til at greiða frá torgreiddum fyribrigdum. Sum skúlaárini ganga, og tá ið komið verður á hægri floksstig, skal munur verða á gerandismáli og fakmáli.[20]

Tað hevur týdning at skilja ímillum gerandismál og fakmál. Um ein næmingur við avmarkaðum orðfeingi ikki megnar at fylgja við í eini lærugrein sum lívfrøði ella støddfrøði, so fer nógv orka til spillis hjá næminginum. Lærarin skal hava fyrilit fyri, at næmingar kunnu hava avmarkað orðfeingi og nýta mannagongdir, ið bæði hjálpa til at menna eitt meiri fullfíggjað mál og miðla fakligt innihald til børn, sum hava vantandi fakligar málførleikar.

**Aftrat málmenningini hjá næminginum eru onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi.**

Í donskum tilfari, *Organisering af folkeskolens undervisning af tosprogede elever*, verða hesir faktorar tiknir fram sum partar av málmenningini hjá einstaka næminginum:

- fortreytir og aldur hjá einstaka næminginum
- vinalagssambond í skúla og frítíð
- móðurmálið hjá næminginum
- heimið og alt umhvørvið hjá næminginum
- fyriskipan av skúlans undirvísing og tilfeingi[21]

Hesi somu viðurskifti eru viðkomandi í sambandi við tímajáttan og at skipa undirvísingina í føroyskum fyri næmingar, ið hava eitt annað móðurmál enn føroyskt, sí oyðublað.

## Tríggir undirvísingarhættir

Í hesum parti verður í stóran mun tikið støði í síðunum 8-11 í tilfarinum, *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, útgivið av Undervisningsministeriet og Trygfondens børneforsikringscenter í 2017, har víst verður á, at úrtøkan av undirvísingini hjá tvímæltum næmingum kann gerast betri, og at tríggir undirvísingarhættir hava serliga ávirkan.

Væl eydnað námsfrøðilig átøk skapa karmar fyri, at tvímæltir næmingar eru virknir í ymsum samskiftisstøðum, antin í flokshøli ella í minni bólkum, ið geva teimum fleiri royndir í at tosa føroyskt og møguleikar at brúka málið í talu og skrift.

Hóast víst verður til evidens-grundaðar undirvísingarhættir, merkir hetta ikki, at tað bara eru ávísir undirvísingarhættir, ið tryggja eitt gott úrslit. Undirvísingartilgongdin skal tí ikki einans verða grundað á tey háttaløg, ið granskingin viðmælir, men sannlíkindini fyri at røkka einum góðum úrsliti eru størri, tá ið hesi háttaløg verða nýtt og eisini saman við teimum undirvísingarhættum, ið lærarin hevur góðar royndir við.[22]

**Endamálið við lesing er at fata tað, ið lisið verður. Fortreytirnar fyri hesum eru:**

- at næmingurin megnar at avkota orðini,
- at næmingurin skilur orðini ella kann greina týdningin úr samanhanginum, og
- at næmingurin megnar at savna seg um setningin fyri at skilja samlaða týdningin

Víst verður til hesar tríggjar undirvísingarhættir:

- Skipað og gjøgnumskygd leiðbeining
- Kollaborativ læring við virknari interaktión millum næmingarnar
- Eftirmeting og tillagað undirvísing[23]

### I) Skipað og gjøgnumskygd leiðbeining

Hesin undirvísingarháttur tekur støði í, at lærarin:

- hugsar alla læringartilgongdina ígjøgnum
- setur partarnar í eina logiska raðfylgju

20 Ibid., bls. 4.
21 *Organisering af folkeskolens undervisning af tosprogede elever*, bls. 9.
22 *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, bls. 8.
23 Ibid., bls. 8. Viðmerkjast skal, at tey tiltøk og viðmæli, ið her verða lýst, ikki einans eru viðkomandi fyri tvímælt við tilflytarabakgrund, men eisini aðrar næmingar, ið hava vantandi førleika at tosa og skilja føroyskt.

- tryggjar sær, at nýggj vitan byggir á lærdóm, ið næmingurin hevur nomið sær

Gransking hevur víst, at børn ogna sær nýggja vitan í eini ávísari raðfylgju. Eitt gott, kent dømi úr Danmark, ið viðvíkur øllum næmingum, ikki bara tvímæltum, er Jens Molzen 2013, *Klar til at bryde læsekoden. 10 faglige forløb der får alle med.*

*Gjøgnumskygd leiðbeining* merkir, at næmingarnir eru kunnaðir um,

- hvat málið er við læringini
- hví tað er týdningarmikið
- hvussu arbeitt verður fram ímóti málinum

*Gjøgnumskygd leiðbeining* byggir á, at teir førleikar, ið næmingarnir skulu ogna sær, eru heilt greiðir fyri næmingunum. Lærarin greiðir gjølla frá ætlanini við dømum og hjálpir næminginum gjøgnum forðingar, sum teir ikki klára einsamallir, sí dømi um virknan læringarstuðul. Tað er sera umráðandi, at undirvísingin tekur støði í tí førleika, tvímælti næmingurin hevur, og ikki byggir á eitt grundarlag, sum ikki er nóg grundfest. Hetta atlit verður tikið við skipaðari og gjøgnumskygdari leiðbeining.

Eitt dømi, ið verður givið, er fakorðið *lava* ella *grótbræðing* (sí niðanfyri).

### Virkin læringarstuðul

Lærarin hjálpir næminginum at vinna á forðingum, ið næmingurin ikki hevði megnað sjálvur, antin við at lærari og næmingur hjálpast at, ella at lærarin avmarkar svarmøguleikarnar.

*Við at hjálpast at*
Lærari: Minnist tú onkrar av komplementerlitunum?
Næmingur: Neiiii, eg haldi ikki.
Lærari: Um eg nú nevni tveir: gult og lilla, nevn tú so eitt annað par?

*Avmarkaðir svarmøguleikar*
Lærari: Hvat tónaslag er tað, sum nógv tónaskøld brúka til at skriva syrgilig løg?
Næmingur: [einki svar]
Lærari: Heldur tú, at tað er dur ella moll?

**Gjøgnumskygd frágreiðing:** Orðið skal setast inn í ein ávísan samanhang, ið gevur meining, og skal eisini setast í samband við onnur orð innan sama evni. Tað er ikki nóg mikið at síggja eina mynd av *lava* ella *grótbræðing*. Orðið skal eisini setast í samband við orð, ið eru sprottin av sama fyribrigdi, til dømis: gosfjall, hiti, bræðing, steinur, landgrunnur – alt í mun til aldur og floksstig hjá næmingunum. Orðini fáa soleiðis eitt pláss í einum netverki av orðum innan sama evni, orðini verða bundin saman.

**Endurtøkur:** Fyri at orðið grótbræðing ella lava skal festa seg í minnið, verður orðið endurtikið fleiri ferðir í ymiskum samanhangum, sum eru viðkomandi fyri barnið, so at barnið kann brúka síni viðføddu natúrligu evni til at skapa samband millum orð og innihald. Jú oftari barnið hoyrir ljóðið *l-a-v-a* ella *grót-bræð-ing* ella sær bókstavirnar, tess sterkari gerast tey neuralu sambondini í heilanum, sum fremja læringina. Endurtøkur eydnast bara, um barnið byrjar at seta orðið í samband við onnur orð, sum nevnt omanfyri. Myndir av gosfjøllum, stabbagróti og ítøkiligt grót, ið barnið kann halda í.

**Virkin nýtsla:** Fyri at tryggja ta neuralu umboðanina av orðinum, læringina, skal næmingurin nýta orðið ella førleikan í fleiri ymiskum samanhangum.

**Umhugsan:** Tað krevst nógv vitan fyri at byrja at læra at lesa. Umhugsa, um hetta eru viðkomandi spurningar, sum næmingurin eigur at fáa svaraðar. Hvussu nógvar av spurningunum kunnu vit vænta, at flestu næmingar kunnu svara. Kunnu vit rokna við, at allir næmingar kenna øll svarini?

*Hví skal eg læra at lesa? Hvat kann eg brúka tað*

*til? Hví kann eg ikki bara læra tað eina aðru ferð? Hvat merkir tað "at lesa" veruliga? Hvat er ein bók? Hvat er ein síða? Hvat er ein regla? Hvat er eitt heiti? Hvat er ein yvirskrift? Hvat merkir at blaða? Hvat er eitt orð? Hvat er eitt málljóð? Hvat er ein bókstavur?*

Tað hevur týdning hjá næminginum at kenna svarini til spurningarnar heilt tíðliga í tilgongdini. Tað er nú ikki vist, at øll tvímælt børn og somuleiðis øll børn, ið hava føroyskt sum móðurmál, koma úr heimum, har tað er siðvenja at lesa, at foreldrini lesa, ella at lisið verður fyri og saman við børnunum. Við eini skipaðari og gjøgnumskygdari leiðbeining ber til at tryggja, at næmingarnir fáa svar upp á hesar spurningar, og at teir fáa svarini í eini skynsamari raðfylgju, áðrenn veruliga lesitilgongdin byrjar.

*Dømi*

Lærarin kann nýta opnar, uppfylgjandi spurningar til at geva meira framkomnum tvímæltum næmingum avbjóðingar, har næmingarnar nýta nýggj orð og hugtøk. Hetta styrkir samstundis teirra evni at taka samanum og teirra hugsanarrevni sum heild. Spurningar kunnu snúgva seg um, at:

**Fáa greiði á**
- Kanst tú at greiða frá hesum?
- Kanst tú nevna eitt dømi?

**Grundgeva fyri**
- Hví heldur tú tað?
- Hvussu kunnu vit vita tað?

**Granska aðrar frágreiðingar**
- Hvat hevði onkur, sum er ósamdur við teg, sagt?
- Hvør munur er millum hesi bæði sjónarmiðini?

**Greina og síggja avleiðingar**
- Hvussu kanst tú finna út av, um tað er rætt?



- Hvat hevði hent, um vit gjørdu soleiðis?

**Finna hugtøk og hugskot**
- Hvat er tað grundleggjandi sjónarmiðið í hesum føri?
- Hvussu kanst tú allýsa...?

## II) Samstarvandi læring - Kollaborativ læring

Tá ið lærari nýtir henda undirvísingarhátt og setur næmingar saman at arbeiða, antin í smærri bólkum ella tveir og tveir, so krevst, at lærarin leggur eina neyva ætlan fyri læringina, har hann umhugsar, hvat málið er, hvussu bólkarnir verða settir saman, og hvussu bólkarnir kunnu fáa sum mest burturúr. Tað er eitt krav, at næmingarnir eiga ein virknan lut í hesi lærustøðuni. Hvør næmingur skal hava møguleika at koma til orðanna í nógv størri mun enn í vanligari floksundirvísing. Hesin undirvísingarhátturin hevur víst seg at geva góð úrslit bæði viðvíkjandi at læra málið (føroyskt), lesiførleika hjá tvímæltum næmingum og á øðrum fakøkjum.

### Hvussu verður arbeitt í samstarvandi læring?

Næmingar kunnu arbeiða saman um at loysa eina ávísa uppgávu, antin í bólki ella tveir og tveir. Ofta verða bólkarnir settir saman soleiðis, at fakliga stinnir og fakliga veikir næmingar arbeiða saman. Fyrimunurin við, at fakliga stinnir næmingar hjálpa teimum veikaru, er, at fakliga veikir næmingar fáa høvi at uppliva og læra orðingarnar, sum javnaldurin nýtir um førleikan ella uppgávuna, sum teir skulu arbeiða við. Fyrimunurin hjá tí fakliga stinnara næminginum er, at hann má skipa sína vitan fyri at kunna miðla hana víðari, og við hesi miðling verður førleiki hansara styrktur uppaftur meiri.

### Leikluturin hjá læraranum

Næmingarnir fáa vanliga at vita, hvussu arbeiðið í bólkinum skal fara fram, hvat endamálið er, og hvussu verður væntað, at teir skulu samarbeiða. Ein fyritreyt fyri, at bólkaarbeiðið eydnast væl, er sjálvsagt, at bólkurin virkar sum ætlað. Hetta merkir, at arbeiðið hjá læraranum í størri mun er at miðla *samstarv* enn *vitan*. Tá ið arbeiðið eydnast, hevur hvør næmingur møguleika bæði til at nýta sína vitan og styrkja og menna hana, m.a. við at nýta fleiri faklig orð ella venja seg at lesa upp fyri hvørjum øðrum.

Ein annar fyrimunur við bólkaarbeiði hjá tvímæltum næmingum er, at teir í summum førum kunnu hava tann fyrimun, at teir kunnu tosa um arbeiðið á sínum egna móðurmáli, um tað ber til at seta bólkarnar soleiðis saman. Harvið er ikki sagt, at læring á móðurmálinum kann koma í staðin fyri læring á føroyskum, men at skilja umvegis móðurmálið kann í summum førum loysa fatanartrupulleikar og betra um úrtøkuna.

*Dømi*

Tveir næmingar á ymiskum førleikastigi arbeiða saman um at skriva ein tekst um pyramidurnar. Tann fakliga stinnari næmingurin hevur leiklutin sum hjálpari, meðan hin fakliga veikari næmingurin skal skriva.

Uppgávan hjá tí fakliga stinnara næminginum er:

- at hjálpa til at leggja eina ætlan fyri uppgávuna
- at hjálpa til at skilja tekstirnar, sum arbeiðið byggir á
- at skipa skrivingina
- koma við hugskotum
- seta fram uppskot um aðrar loysnir
- hjálpa við stavseting og teknseting.
- lesa ígjøgnum og syrgja fyri, at teksturin hongur væl saman

Uppgávan hjá læraranum er at leiðbeina í samstarvinum og hjálpa næmingunum at megna ta viðkvomu støðu, sum møguliga kann koma í, orsaka av

ymisku leiklutunum, ið næmingarnir í bólkinum hava. Harumframt er lærarans uppgáva at stuðla og rósa næmingunum fyri teirra ídni og avrik.

## III) Eftirmeting og tillagað undirvísing

Undirvísingarhátturin, ið tykist geva best úrslit, er sambært eini samanberandi gjøgnumgongd av gransking á økinum ein undirvísingarháttur, har skipað og gjøgnumskygd leiðbeining verður knýtt at eftirmeting og tillaging í undirvísingini, eisini kend sum *response to intervention.*[24]

Hetta er meira eitt bygnaðarligt (strukturelt) átak enn námsfrøðiligt. Átakið er ein skipanarlig mannagongd um, hvussu gjørt verður, tá ið næmingar fakliga dragna afturúr. Vanliga verða átøkini skipað í trimum stigum:

- fyrsta stigið er undirvísing í flokkinum við næmingalagaðari undirvísing við teimum møguleikum, sum eru í floksundirvísingini.
- annað stigið er fyri næmingar, ið ikki gera nøktandi framstig, antin sambært roynd ella grundgivnu meting lærarans. Hesir næmingar fáa umframt vanliga floksundirvísing eyka undirvísing í bólki í 20 ella 45 minuttir hvønn ella annanhvønn dag við tí endamáli at koma upp á sama støði sum hini í flokkinum.
- um annað stig heldur ikki ger mun, so verður næmingurin vístur til triðja stig, har serfrøðingar í námsfrøði ella á øðrum øki gera eina heildarmynd av støðuni hjá barninum. Sjálvsagt kunnu tað vera aðrar orsøkir enn tær reint fakligu, ið gera, at næmingurin hevur tað trupult í undirvísingini. Átøkini verða fleiri, inntil fakliga málið er rokkið.

Í føroyska fólkaskúlanum er ein slíkur bygnaður ikki ókendur. Tað er skúlaleiðslan og skúlaverkið, sum skal skipa fyri, at hesin námsháttur kann skipast í verki. Leisturin er eisini grundaður á, at førleikarnir hjá næmingunum javnan verða kannaðir í tilgongdini, og hetta krevur, at hóskandi royndartilfar er tøkt.

Lærararnir mugu hava ítøkilig mál og lutmál fyri teir førleikar, sum næmingarnir skulu ogna sær. Hetta er neyðugt fyri regluliga at kunna meta um menningina hjá næminginum í mun til ásettu málini.

Allir næmingar læra sjálvsagt ikki líka skjótt, og summir næmingar læra í lopum. Hesum skal eisini vera rúm fyri, men tað skal ikki vera pláss fyri, at næmingar dragna munandi afturúr. Hetta er ein misskilt rúmligheit, ið kann hava álvarsligar fylgjur fyri barnsins menning og møguleikar seinni í lívinum, og ikki minst fyri møguleikarnar í skúlaárunum at mennast á jøvnum føti við aðrar næmingar.

*Dømi*

Øll í flokkinum hava brotið *lesikotuna* og eru byrjað at lesa uttan fýra næmingar. Hesir fýra næmingarnir fáa eyka undirvísing 45 minuttir um dagin í einum bólki saman við tveimum næmingum úr einum øðrum flokki.

Í bólkinum fáa næmingarnir skipaða og gjølliga leiðbeining í teimum førleikum, ið kravdir eru fyri at megna at lesa, til dømis at stava (býta orð í minni partar).

Eftir trimum mánaðum hava tveir næmingar *loyst lesikotuna* og gevast við eyka bólkaundirvísingini. Allir hinir næmingarnir, uttan ein, eru væl á veg og halda fram í bólkaundirvísingini.

Hesin eini næmingurin ger eingi serlig framstig, og gjørd verður við hjálp frá viðkomandi serfrøðingum ein neyvari greining fyri at finna fram til foreðingar fyri læringini hjá næminginum, bæði viðføddar og umhvørvisligar. Næmingurin fær eitt undirvísingartilboð, ið er lagað til hansara fortreytir, og sum kann hjálpa næminginum víðari við støði í teimum umstøðum, sum hann er í.

24 *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever*, bls. 11.





# FORELDRASAMSTARV, SAMSKIFTI OG TULKING

**Í hesum parti verður víst á týdningin, ið samstarvið við foreldrini hevur, um vælvirkandi samskifti og um tulking.**

## Foreldrasamstarv

Skúlans arbeiði er í stóran mun grundað á samstarv við foreldrini. Leikluturin hjá foreldrunum er ásettur longu í endamáli fólkaskúlans, har ásett er, at arbeiði skúlans, at veita einstaka næminginum fjøltáttaða undirvísing, skal verða gjørt í samstarvi við foreldrini. Sostatt hava foreldrini ein sera virknan leiklut í skúlagongdini hjá barni ella børnum sínum og skulu samstarva við skúlan um, at barn ella børn teirra fáa sum mest burtur úr undirvísingini.

**Áseting í endamálsgrein fólkaskúlans:**

Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Tað er umráðandi, at skúlin setur seg í samband við heimið, tá ið næmingurin er skrivaður inn í skúlan, sum eisini áður er umrøtt undir evninum byrjanarsamrøða. Samstarv við heimini hevur stóran týdning í skúlagongdini hjá øllum næmingum, og ikki minst hjá teimum, sum flyta til Føroya og hvørki kenna okkara siðir og samfelag ella duga málið. Tað eru so nógv viðurskifti, sum bæði næmingurin og familjan skulu seta seg inn í. Tó er í fleiri førum annað foreldrið føroyskt, serliga í sambandi við familjusameining. Tað er eisini so ymiskt, hvussu familjurnar eru fyri málsliga, og um tað er siðvenja hjá teimum at lesa og gera skúlating saman við barninum.

Flokslæraraskipanin, sum er umrødd í 1. parti um karm og skipanir, hevur alstóran týdning bæði viðvíkjandi foreldrasamstarvi og trivnaðararbeiðinum í flokkinum umframt kunning til bæði foreldur og leiðslu. Flokslærarin hevur ein serligan leiklut við atliti at sambandinum og samstarvinum við heimini, og tí er umráðandi, at flokslærarin altíð er við í arbeiðinum, tá ið næmingur, ið flytur til Føroya, verður innskrivaður í hansara flokk.

Eisini er umráðandi at seta orð á, at foreldrasamstarv er ein interaktión millum skúla og heim, har báðir partar mugu gera sítt til, at samstarvið eydnast, og at nýggir næmingar falla væl til í flokkinum og megna at fylgja við fakliga og læra nýggja málið. Tað er umráðandi at fáa foreldrasamstarvið at virka í verki, so at foreldrini altíð eru kunnað um arbeiðið og trivnað næmingsins og hava møguleika at hjálpa og stuðla børnum sínum í skúlagongdini. Eisini eiga foreldrini at verða kunnað um, hvussu týdningarmikið tað er, at tey virka fyri, at næmingurin røkir skúlagongdina til lítar, og at hann er væl fyri, tá ið hann kemur í skúla.

Nógvir flokkar hava eisini foreldrabólkar, ið er ein liður í at styrkja arbeiðið millum skúla og heim. Hetta er ein skipan, sum foreldur, ið eru nýkomin til Føroya, eiga at verða kunnað um og luttaka í. Foreldrabólkar skipa í samstarvi við flokslæraran og flokstoymið fyri hugnaløtum og felags tiltøkum fyri foreldur og børn. Endamálið við hesum tiltøkum er m.a. at stuðla sosiala lívið í flokkinum, og at foreldur kunnu hjálpa til við ymiskum uppgávum og koma at kenna hvørt annað og hugburðin hjá hvørjum øðrum. Foreldrabólkarnir kunnu eisini taka mál upp, sum hava felags áhuga, t.d. songartíðir, føðingardagar o.a. fyri at draga somu línu og fyri eitt nú at minka um bólkatrýstið á einstakar næmingar.

Í samrøðum við foreldur, har annað ella bæði foreldrini eru tilflytarar, kann tað málsliga vera ein stór avbjóðing hjá skúlunum, sum neyðugt er at taka atlit at. Tað er tí umráðandi, at lærarin tryggjar sær, at foreldrini vita, hvat endamálið er við samrøðuni, og um talan er um foreldraviðtalu ella foreldrafund. Eisini er neyðugt, at lærarin orðar seg so týðiliga og so neyvt sum til ber. Tað kann vera neyðugt at endurtaka og umorða seg, ella at spyrja umaftur, um lærarin heldur, at foreldrini ikki skilja tað, ið sagt verður. Eisini er tað avgerandi, at lærarin lurtar eftir foreldrunum og gevur teimum møguleika at koma til orðanna. Greiðast skal væl frá boðum, ið eru serliga týdningarmikil. Tað er í hesum støðum neyðugt at umhugsa, um tørvur er á tulki.

## Tulking – ein týðandi liður í samstarvinum við foreldrini/heimið

Fyri at tryggja eitt gott samskifti hevur tað alstóran týdning, at partarnir í samrøðuni og samstarvinum skilja hvør annan. Tað er skúlin, ið skal meta um og avgera, um tulkur skal brúkast. Skúlin hevur skyldu til at gera seg skilligan og at tryggja sær, at boðini verða móttikin av foreldrunum soleiðis, at tey skilja boðini. Og eisini skal skúlin skilja tað, sum foreldrini siga.

Hvør einstakur skúli skal gera sær ein politikk víkjandi at nýta tulk. Lærarar kunnu síðan brúka hetta sum leiðreglu og annars brúka sína námsfrøðiligu, fakligu vitan í slíkum samanhangum.

Næmingar skulu ikki brúkast sum tulkar í sambandi við skúla-heim samstarv. Hetta gevur barninum ein leiklut og ábyrgd, sum tað ikki kann hava førleikar til ella fyritreytir fyri at taka á seg – av hesum orsøkum:

- Næmingar hava ikki málsligu fyritreytirnar til at megna at tulka rætt.
- Tað skeiklar javnvágina í familjuni, um barnið verður brúkt sum tulkur.
- Tað kann vera sera óhugaligt hjá einum barni at skula geva víðari negativa meting um seg sjálvt.[25]

Tulking verður vanliga brúkt til einstakar samrøður, so sum foreldrasamrøðu ella byrjanarsamrøður og førleikameting, vanliga ikki til undirvísing. Í grannalondum okkara kemur tað fyri, at tey brúka ein 2. lærara ella hjálparlærara, ið dugir málið, ið barnið tosar. Hetta verður t.d. brúkt í Noregi á fyriskipaðan hátt sum partur av skúlatilboðnum í serligum førum.

Í Føroyum er eingin formligur karmur kring tulking av fremmandamálum[26], men Útlendingastovan samskipar atgongd til danskar tulkaveitarar og hevur samband við tulkar í Føroyum. Skúlar kunnu venda sær til Útlendingastovuna.

25 *Det gode skole-hjem samarbejde – Håndbog i skole-hjem samarbejde med nydanske forældre*, bls. 44.
26 Tó er fyrisitingarlógin grein 7 viðkomandi her og avleidda *vegleiðingarskyldan* hjá almennum fyrisitingarstovnum.

# DØMI UM UNDIRVÍSINGARMIÐLAR

**Í hesum partinum greiða lærarar í verkætlanarbólkinum frá dømum um undirvísingarmiðlar og mannagongdir, sum teir nýta í sambandi við at leggja til rættis og fremja undirvísing, ið er ætlað tvímæltum næmingum. Talan er bæði um næmingar, sum flyta til landið og næmingar, sum hava tørv á málsligari menning. Talan er serliga um at menna orðfeingið, men eisini um trivnað, foreldrasamstarv og at kanna lesiførleikan hjá næminginum.**

## I) Dømi um ymiskt virksemi og tilfar

Mannagongd: Vanliga leggja vit tað soleiðis til rættis, at vit byrja at arbeiða við bókastavaraðnum, síðan við orðum og orðfeingi. Lærd verða orð, ið hoyra til ymiskar samanhangir, so sum í skúlastovuni, á vesirúminum, í køkinum og so framvegis. Eisini spæla vit og gera rolluspøl, tá ið næmingarnir eru í smærri bólkum. Tá ið næmingar hava gingið í eina tíð, hava vit eisini brúkt onkra lætta landsroynd.





Undirvísingarmiðlar: Vit nýta *NEM, mál í triðja, NEM, mál í fjórða, Krabbabøkur,* umframt uppgávur og *Súlubøkurnar.*

## II) Dømi um ymiskt virksemi og tilfar

Mannagongd: Vit leggja dent á prát og samrøðuvenjingar á føroyskum. Vit nýta til dømis spælið *Alias* (sí mynd), har orð verða sett á myndirnar, og vit royna at byggja upp orðfeingi á henda hátt.





Undirvísingarmiðlar: *1001-orð*, *Alias*, føroysk orðaspøl, vitja í skúlakøkinum, hyggja at ymsu lutunum, tosa um og seta orð á. Harumframt nýta vit Myndaorðabókina og Súluspølini.

## III) Dømi um lesikanning og tilfar

Mannagongd: Lesivegleiðarin luttekur í arbeiðinum at skipa undirvísingina fyri tvímæltum næmingum. Vit gera altíð eina kanning av lesistøðinum, tá ið tvímæltir næmingar byrja í skúlanum.

Undirvísingarmiðlar: Í miðdeild, 4., 5. og 6 . flokki, nýta vit heftið *Lixaðir tekstir*. Hetta heftið er gjørt soleiðis, at hædd verður tikin fyri, at talan er um eina tilgongd. Harumframt nýta vit *Myndaorðabókina* og bøkurnar hjá Bergljót av Skarði, *Vælkomin og Viti – føroyskt sum fremmandamál.*




## IV) Dømi um ymiskt virksemi og tilfar

Mannagongd: Vit leggja dent á, at næmingarnir ogna sær eitt orðfeingi, læra at lesa, skriva og samskifta á føroyskum.

Undirvísingarmiðlar: Næmingarnir læra heitini á ymsum lutum. Til dømis verður tosað um navn, skap, lit og annað á 10 ymiskum lutum, og síðan verður eitt klæði lagt yvir lutirnar. Næmingarnir kunnu nú spæla minnisspæl. Ella kunnu teir eisini skiftast um at lýsa lutir við orðingum, so viðspælarin gitir navnið á lutunum.

Vit brúka *Fyrstu túsund orðini: á føroyskum, Myndaorðabókina* eins og *Súlu-tilfarið*. Eisini spæla vit bingo, har næmingarnir læra tøl, at falda og aðrar roknireglur.

Vit nýta hóskandi *Krabbabøkur* í undirvísingini, lesa saman við næminginum og tosa um orð, setningar og innihald. Eisini kann næmingurin lesa sjálvur ella lesa tey parvís og svara uppgávum til krabbabøkurnar.

*Orðakassar*. Næmingarnir læra betur at stava, tá ið teir sjálvir gera egnar orðakassar. Mannagongdin er, at hvør næmingur hevur smáar plastikkposar í einum kassa.

Tá næmingurin hevur arbeitt við ymiskum orðaflokkum, sum navnorðum, sagnorðum, lýsingarorðum og fornøvnum, so verða orðini skrivað á smáar lepar og síðan koyrd í navnorðaposan, sagnorðaposan o.s.fr..

Vit arbeiða við orðum, sum næmingarnir hava torført við at stava, benda ella skilja, og ofta eru tað orð úr fyrisøgnum, søguskriving ella krabbabókum, sum koma í orðakassan. Til dømis:

| | | |
|---|---|---|
| døgurða | súkkla | Meðan |
| honum | trý | tríggir |





*Brot úr hefti við uppgávum*





Fyri at venja føroyska talu kunnu næmingarnir eisini gera tekningar. Ein næmingur fjalir sína tekning, meðan hann greiðir frá, hvussu ein annar næmingur skal tekna á tað blanka pappírið.

Eitt hús er teknað á pappírið – og boðini kunnu verða:

- tekna tvey vindeygu og eina reyða hurð
- tekna eina gula sól, o.s.fr.

Endamálið er, at báðar tekningarnar skulu líkjast.

## V) Dømi – Muður melur, tað sum hugur elur

Hending í skúlanum. Í hesum dømi snýr tað seg um, hvussu áhugi hjá næminginum kann gerast lykil til víðari menning í tilgongdini. Ein umskriving av orðataki ljóðar: *Muður melur, tað sum hugur elur.*[27]

Ein lærari greiðir frá, hvussu ein trupul byrjan gjørdist nakað léttari: "Vit fingu ein næming í grunddeildina, sum júst var komin til landið. Tað gekk ikki so væl at byrja við. Eg royndi mangt og hvat, men næmingurin tosaði næstan einki, og fylgdi ikki so væl við... Men so ein dagin hendi ein stór broyting, nokk so stuttligt var tað. Stovan, har vit vanliga høvdu undirvísing í føroyskum ein tíma um vikuna, var stongd ella

27 Hetta var heiti á fyrilestri, sum Sissal Maria Rasmussen (exam.art. í føroyskum og cand.mag í audiologopedi) helt á tí eina verkætlanardegnum á várið í 2019 um tvímælt og undirvísing.

upptikin av øðrum, tí hugsaði eg, at so fara vit bara inn í rúmið við leikum og øðrum. Og hvat hendi – jú, tá byrjaði næmingurin, sum var ein genta, at práta og fortelja og spyrja nógv eisini. Eitt sindur óvæntað og ikki tilætlað, so broytti hetta fullkomiliga fyrstu tilgongdina."

## VI) Dømi um foreldrasamstarv og tilfar

Mannagongd: Vit arbeiða nógv við foreldrasamstarvi í sambandi við móttøku og at skipa undirvísingina fyri tvímæltar næmingar. Vit skipa fyri foreldrakvøldi og royna, so vítt tað er gjørligt, at hava bæði foreldrini við, tá ið foreldrafundur er á skrá. *Altíð bæði foreldrini*, er okkara mál. Fundurin kann fyri ein part verða hildin umvegis Skype/Facetime, um annað ikki ber til. Tað ger mun, tí at tað gevur okkum nakrar knakar at heingja viðurskifti og avtalur í námsfrøðiliga arbeiðinum á.

Vit hava skipað eitt sokallað fleirmælt foreldrakvøld, sum var sera væl eydnað við góðari uppmøting. Á kvøldinum umrøddu vit evni so sum avbjóðingar, og hvørjar væntanir foreldur hava til skúlan.

Undirvísingarmiðlar: Vit nýta eina *samskiftisbók* ella *-hefti*, ið verður latin aftur og fram millum skúla og heim. Hetta stuðlar samskifti og kunning millum foreldur og læraran. Vit nýta ymisk spøl sum at telva, har næmingarnir arbeiða í bólkum, onkuntíð tekur lærarin lut í spælinum, onkuntíð ikki, at kenna litir, "sig fýra litir" og spøl við kortum (sí mynd).

Viðkomandi lærari legði áherðslu á, at tað er umráðandi at hava ein amboðskassa, har *screening* eisini kundi verið ein partur.






## VII) Dømi – øðrvísi skipan

Mannagongd: Í einum minni skúla hava tey umframt vanliga undirvísing brúkt tilfeingi, ið liggur uttan fyri skúlan og hava m.a. góðar royndir við, at næmingur vitjar heima hjá lærara, ið er farin frá fyri aldur. Hetta verður skipað í samstarvi við flokslæraran.

# FYLGISKJØL



**Skjal 1 - Oyðublað at nýta í sambandi við umsókn til Undirvísingarstýrið**

# Umsókn um undirvísing
## í føroyskum til næming, ið hevur føroyskt sum seinna málið

Umsóknin verður send Undirvísingarstýrinum

**Skúli:** ______________________ **Skúlaár:** ______________________

**Næmingur:** ______________________ **Fødd/ur:** ______________ **Flokkur:** ______________

**Frágreiðing um fortreytir næmingsins í føroyskum:** Greitt verður frá málsliga grundarlagnum hjá næminginum, har m.a. hesir spurningar verða svaraðir:

Úr hvørjum landi er næmingurin? ______________________

Nær er næmingurin fluttur til Føroya? ______________________

Hvat/hvørji mál tosar næmingurin? ______________________

Duga foreldrini føroyskt? ______________________

Hvørja undirvísing og málmenning í føroyskum hevur næmingurin fingið higartil? ______________________

______________________________________________

______________________________________________

Næmingabólkur, har næmingurin luttekur ______________________

**Dagfesting:** ______________ **Undirskrift skúlaleiðarans:** ______________________

**Avgerð í Undirvísingarstýrinum:**

Játtaðir verða __________ tímar í tíðarskeiðnum ______________________

**Dagfesting:** ______________ **Undirvísingarstýrið:** ______________________

## Skjal 2 - Vanligastu orðini

Hesin orðalistin er dømi um amboð, sum lærarar brúka í undirvísingini av tvímæltum næmingum fyrstu tíðina. Orðalistin kann brúkast fyri ein part í fyrstu tíðini. Gott er hjá næmingum at læra hesi orðini at kenna – at lesa, at stava og skriva tey.[28]

| | 2 bókstavar | 3 bókstavar | 4 bókstavar | 5 bókstavar | 6 bókstavar | 7 bókstavar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | og | nei | eitt | heilt | teimum | hansara |
| 2 | at | ein | hann | beint | heldur | hennara |
| 3 | so | tey | teir | langt | skuldi | børnini |
| 4 | eg | var | fekk | oman | longur | hugsaði |
| 5 | er | tað | helt | einki | sindur | |
| 6 | tí | við | heim | eigur | hvussu | |
| 7 | av | hon | skal | einum | burtur | |
| 8 | um | sum | ferð | segði | skuldu | |
| 9 | tú | men | fram | hevði | ferðir | |
| 10 | nú | til | hvat | aftur | fingið | |
| 11 | tá | sær | sagt | hetta | spurdi | |
| 12 | úr | upp | kann | lítla | verður | |
| 13 | sá | vit | gekk | henni | farin | |
| 14 | ja | har | hvar | honum | fingu | |
| 15 | | tær | stað | høvdu | mátti | |
| 16 | | kom | tann | sólin | skulu | |
| 17 | | seg | stóð | undir | lítið | |
| 18 | | fór | eina | altíð | eisini | |
| 19 | | inn | ikki | sigur | teirra | |
| 20 | | væl | fyri | hevur | | |
| 21 | | hjá | fara | niður | | |
| 22 | | enn | vera | dagin | | |
| 23 | | mær | yvir | kemur | | |
| 24 | | frá | gera | okkum | | |
| 25 | | tit | hana | mamma | | |
| 26 | | øll | bara | nakað | | |
| 27 | | eru | fóru | ganga | | |
| 28 | | tók | koma | komin | | |
| 29 | | sat | hava | legði | | |
| 30 | | alt | ella | sínum | | |
| 31 | | hin | siga | vildi | | |
| 32 | | fer | komu | setti | | |
| 33 | | her | pápi | øllum | | |
| 34 | | fáa | uppi | verið | | |
| 35 | | dag | bæði | allar | | |
| 36 | | hav | vita | spæla | | |
| 37 | | eta | havi | saman | | |
| 38 | | meg | inni | rópti | | |
| 39 | | bað | saman | meðan | | |
| 40 | | vil | síni | | | |
| 41 | | fær | móti | | | |
| 42 | | mín | illa | | | |
| 43 | | kom | ánna | | | |
| 44 | | úti | vóru | | | |

28 Víst verður eisini til bókaútgávuna *Finka* (NÁM 2020) eftir Marionnu Skarðenni Poulsen, har ein líknandi orðalisti finst.

## Skjal 3 – Faklig orð

*Víðari málslig og faklig menning – góð faklig orð*[29]

Yvirskipað kann tað metast at vera ein stuðul hjá næmingum at læra nøkur faklig orð. Faklig orð skulu ikki skiljast sum fakorð, men heldur orð, ið ikki beinleiðis eru partur av gerandismáli, men verða brúkt á ymiskum fakligum økjum. Í fleiri lærugreinum er gott at kenna nógv av hesum fakligu orðunum. Lærarin kann nýta nøkur av orðum í undirvísingini eftir tørvi, t.d. í sambandi við bólkauppgávur, og sjálvsagt kunnu onnur orð eisini verða viðkomandi. Tað er lærarin, ið best er førur fyri at meta um hetta.

### Málslig og faklig menning

- Greið týðiliga og nágreiniliga frá týðandi fakorðum og fakligum orðum, ið ofta verða brúkt í viðkomandi evni ella nýggjum teksti.
- Næmingarnir skulu brúka málið í virknari interaktión. Til dømis í samstarvandi bólkum.
- Næmingarnir framleiða ein tekst, og er hetta síðsti liður í eini skipaðari innleiðing til fakorð og faklig orð. Endamálið er at tryggja vitan hjá næminginum við at hann brúkar nýggju orðini.
- Tekstir eiga ikki bert at vera endurgeving av vitan, men heldur nakað, ið ber boð um at næmingurin viðger, fatar, grundar yvir og arbeiðir við evninum.

# Faklig orð

| | | | |
|---|---|---|---|
| afturgongd | grafur | nágreiniligur | styrki |
| akademiskur | greining | nøktandi | styrkja |
| áherðsla | grundarlag | orka | subjektivur |
| ástøði | grundleggjandi | óítøkiligur | súmbol |
| ávirkan | hagtøl | óvirkin | tema |
| ávísur | háttalag | politikkur | tilfar |
| ávísa | hjarni | prosent | tillaga |
| dimensjón | høvundur | ráðføra | tilvildarligur |
| djúptøkin | hugsanargrundarlag | rættvísgera | tøkni |
| dygd | hugsavna | ringrás | treyt |
| dynamiskur | innanhýsis | ritstjórna | týðiligur |
| eftirmeta | innlit | sakligur | umleið |
| eind | ímynd | samanhangur | umstøður |
| endurskoða | ískoyti | sameina | uppáhald |
| evni | klassiskur | samvirka | uppfinna |
| flokka | kollvelting | savna saman | uttanhýsis |
| fløktur | lagaligur | serfrøðingur | uttanveltaður |
| forsøgn | lutfall | sjálvvirkin | útihýsa |
| frílyntur | lækking | sjónarhorn | viðkomandi |
| fyrisita | meginregla | skipan | viðmerkja |
| gagnnýta | mið | skráseta | viðurkenna |
| gera íløgu | miðil | skynsamur | virkin |
| gera niðurstøðu | miðsavna | stigi | virknaður |
| geva íkast | mótsetningur | stigatal | vísindaligur |
| gongd | myndugleiki | stovna | ættarlið |

29 Sí meiri á bls. 12 í *Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever* (sí eisini sama stað, bls. 5, um fakmálsligar førleikar). Hesin orðalistin er ætlaður sum íblástur hjá lærararum, ið undirvísir tvímæltum næmingum í 6. flokki og eldri, og sum eru komnir væl ávegis í málmenningini. Listin er ikki egnaður til tvímæltir næmingar, ið nýliga eru byrjaðir at læra føroyskt. Listin er ikki ætlaður sum uppslag í orðabók ella líknandi. Orðalistin tekur støði í einum standardiseraðum lista tilevnaður av málgranskarum úr USA, sí www.newgeneralservicelist.org.

## Skjøl 4 – Leinki til viðkomandi lógarverk

# Leinki til viðkomandi lógarverk (www.logir.fo)

***Fólkaskúlalógin:***
https://logir.fo/Logtingslog/125-fra-20-06-1997-um-folkaskulan-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-34-fra-28

***Førleikastovan, kunngerð nr. 95:***
https://logir.fo/Kunngerd/95-fra-02-07-2019-um-forleikastovur

***Flokslæraraskipanin, kunngerð nr. 37:***
https://logir.fo/Kunngerd/37-fra-26-03-2003-um-flokslaeraran

***Undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing, kunngerð nr. 144:***
https://logir.fo/Kunngerd/144-fra-06-10-2020-um-undirvising-i-foroyskum-sum-annadmal-og-modurmalsundirvising

## Skjal 5 – Uppihaldsloyvi til børn og ung undir 18 ár

Upphaldsloyvi latin umsøkjara fyrstu ferð (upprunaloyvi) av donsku útlendingamyndugleikunum.

| Ár | Familjuøkið | Arbeiðsøkið | |
|---|---|---|---|
| 2012 | 6 | 4 | 10 |
| 2013 | 13 | 9 | 22 |
| 2014 | 11 | 13 | 34 |
| 2015 | 8 | 14 | 22 |
| 2016 | 17 | 12 | 29 |
| 2017 | 17 | 15 | 32 |
| 2018 | 11 | 20 | 31 |
| 2019 | 27 | 30 | 57 |

# KELDUR OG BÓKMENTIR

***Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever (Vidensnotat)***
Undervisningsministeriet 2017
www.childresearch.au.dk – www.emu.dk

***Sprog- og læsekompetencer hos tosprogede elever – Fokus på nyankomne elever (Vidensnotat)***
Undervisningsministeriet 2017
www.childresearch.au.dk – www.emu.dk

***Styrk sproget – en guide til at løfte fagligheden for tosprogede børn og unge i skole og fritidstilbud***
Ministeriet for Børn, Undervisning og Ligestilling (o.o.), 2016

***Styrk sproget i dagtilbud***
Ministeriet for Børn, Undervisning og Ligestilling 2015 (3. udgave)
www.emu.dk/dagtilbud/forskning-og-viden/styrk-sproget

**Annað tilfar:**
***Det gode skole-hjem samarbejde – Håndbog i skole-hjem samarbejde med nydanske forældre***
Ministeriet for Flygtninge, Indvandrere og Integration, 2010

***Organisering af folkeskolens undervisning af tosprogede elever – en vejledning***
Undervisningsministeriet 2017

***Mennandi Sálarfrøði***
Gitte Klein og Ann-Britt Fríðheim Mortensen, Nám, 2018

***Multiple Voices – An Introdution to Bilingualism, Oxford 2006***
Carol Myers-Scotton, Blackwell Publishing, Oxford 2006

***Lesing - ein góð byrjan***
Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, Mentamálaráðið

***Týðandi tættir í námsfrøðiligum arbeiði við fleirmæltum børnum***
Útlendingastovan 2019
www.integration.fo

**Viðkomandi talgilt tilfeingi:**
***www.malmenning.fo***
*Ymiskt tilfar um málmenning og lesing, umframt greinar um t.d. tvímæli*

***www.snar.fo/adrar-utbugvingar/foerleikamenning-og-endurutbgving/foeroyskt-fyri-tilflytarar/lexin***
*Lexin er nógv brúktur miðil ella netforrit við samvirknum ljóð- og myndaorðabókatilfari, sum er ætlað at stuðlað undir innlæringina í føroyskum hjá fólki við øðrum móðurmáli*

***nafo.oslomet.no***
Nasjonalt senter for flerkulturell opplæring

***www.morsmal.no***
Tema Morsmål – nettsted for morsmål og tospråklig fagopplæring





**Bóklingurin og annað tilfar er tøkt á:**
www.integration.fo & www.ummr.fo

Bóklingurin vendir sær til lærarar og starvsfólk annars í skúlum, sum arbeiða við tvímæltum næmingum, ið hava annað móðurmál enn føroyskt.

Tilfarið er vegleiðandi og til íblásturs. Tað fevnir um lýsing av viðkomandi karmum í skúlaverkinum, um skúlabyrjan, móttøku og trivnað, og síðan um at leggja undirvísingina til rættis, tá ið talan er um tvímæltan næming ella næming við føroyskum sum annaðmál.

**ÚTLENDINGASTOVAN &**
**UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ**
**2020**

**Útgávan finst í prenti í avmarkaðari nøgd og á heimasíðunum:**
www.integration.fo www.ummr.fo

Mentamálaráðið
ÚTLENDINGASTOVAN